# LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2006

## FRÁGREIÐING
## UM FRÁVIK MILLUM JÁTTAN OG NÝTSLU O.A.

## LATIN
## LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
"um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

OKTOBER 2007


Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
www.LG.fo

# Innihaldsyvirlit

**1 INNGANGUR 7**

**2 FÍGGJARMÁL 9**

**2.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 9**
2.1.1 SØLA AV PARTABRØVUM Í P/F ELEKTRON 3.11.1.46. 9
2.1.2 TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.04. 9
2.1.3 NÝGGJ FÍGGJARSTÝRING (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.10. 10
2.1.4 HAGSTOVA FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.2.01. 10
2.1.5 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.01. 10
2.1.6 FAS-ENDURGJALD 3.35.1.05. 12
**2.2 MINNINÝTSLA 12**
2.2.1 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.03. 12
2.2.2 LANDSINS OGNIR (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.23. 12
2.2.3 ÚTGJALD ÚR TRYGDARGRUNNINUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.7.10. 12
**2.3 RENTUR/FRÁVIK 13**
2.3.1 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1. 13
2.3.2 MILLUMVERANDI VIÐ TJÓÐBANKAN OG LANDSBANKAN 20.50.2. 14
**2.4 INNTØKUR/FRÁVIK 15**
2.4.1 SKATTAINNTØKUR 20.52.1. 15
2.4.2 AVGJØLD OG TOLLUR 20.52.2. 16
2.4.3 YMSAR INNTØKUR 20.52.3. 16
2.4.4 AÐRAR INNTØKUR 20.52.3.10. 17
2.4.5 HEILDARVEITING O.T. 20.54.1. 18
2.4.6 SERINNTØKUR, ÚTLUTING FRÁ FÍGGINGARGRUNNINUM FRÁ 1992 53.52.3. 18
**2.5 AÐRIR VIÐMERKINGAR 18**
2.5.1 ÓGREIÐA UM JÁTTANIR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD 18
2.5.2 FYRISITINGARÚTREIÐSLUR VERÐA SPJADDAR 19

**3 LØGMANSFYRISITINGIN 21**

**3.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 21**
3.1.1 STJÓRNARSKIPANARNEVND (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.40. 21
3.1.2 LØGMAÐUR OG LANDSSTÝRIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 2.12.3.01. 21
3.1.3 SENDISTOVUR (RAKSTRARJÁTTAN) 2.13.1.01. 21
**3.2 MINNINÝTSLA 22**
3.2.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.02. 22
**3.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 22**
3.3.1 MENNINGARHJÁLP 2.13.3.04. 22

**4 FISKIVINNA 29**

**4.1 MEIRNÝTSLA 29**
4.1.1 GRANSKINGARÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.34. 29
4.1.2 TILBÚGVINGARSAMSKIPAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.31.1.01. 29
4.1.3 UPPLÝSING UM GRIND (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.04. 29
4.1.4 LIMAGJALD Í ALTJÓÐA FELAGSSKAPUM 5.34.1.07. 30
**4.2 MINNINÝTSLA 30**
4.2.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.05. 30
4.2.2 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.15. 30
4.2.3 SØLA AV BYGNINGI HJÁ FISKIMÁLARÁÐNUM (LØGUJÁTTAN) 5.11.1.45. 31
4.2.4 FISKIVINNURÁÐ OG NEVNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.01. 31
4.2.5 LØNJAVNINGARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.10. 31
4.2.6 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.2.01. 31
4.2.7 FISKIVINNUROYNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.07. 31
4.2.8 INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.01. 31
4.2.9 SJÚKRATRYGD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.04. 32
4.2.10 GJALD TIL RÆKJUFLOTAN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.14. 32
4.2.11 FISKIVINNUMENNING Á LANDI 5.34.4.16. 33
4.2.12 FLUTNINGSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.22. 33
4.2.13 TELEFONSTUÐUL TIL LANGFARAFISKIMENN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.37. 33
4.2.14 ÚTLÁN 5.34.5.01. 34
4.2.15 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR 5.34.5.07. 34
4.2.16 SJÓVINNUFYRISITINGIN (SKIPASKRÁSETINGIN) (RAKSTRARJÁTTAN) 5.35.1.01. 34

**5 VINNUMÁL 35**

**5.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 35**
5.1.1 SØLA AV LANDSINS OGNUM (LØGUJÁTTAN) 6.11.1.47. 35
5.1.2 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LANDSFYRITØKA) 6.37.3.01. 36
5.1.3 LÁNSAFTURGJALD 6.37.6.01. 36
5.1.4 NÝGGIR LANDSVEGIR (LØGUJÁTTAN) 6.38.1.07. 36
**5.2 MINNINÝTSLA 37**
5.2.1 JARÐFEINGI (RAKSTRARJÁTTAN) 6.32.1.03. 37
5.2.2 INNSAVNAN AV ULL OG SKINNUM 6.33.2.02. 38
5.2.3 ALMENN JØRÐ, SØLA 6.33.2.11. 38
5.2.4 FISKASJÚKUTÆNASTUR (RAKSTRARJÁTTAN) 6.36.1.07. 38
5.2.5 SKRÁSETING FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.18. 39
5.2.6 TRYGGINGAREFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.21. 39
5.2.7 UMBYGGING AV HEILSUFRØÐILIGU STARVSSTOVUNI (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.05. 39
5.2.8 GRANSKINGARLUND (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.06. 40
5.2.9 LANDSVERK (RAKSTRARJÁTTAN) 6.38.1.02. 40
5.2.10 STUÐUL TIL INFRAKERVIÐ Á ÚTOYGGJUM 6.38.1.18. 40
5.2.11 FLOGFERÐSLA (LØGUJÁTTAN) 6.38.2.13. 40
5.2.12 BARSILSSKIPAN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.01. 41
**5.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 41**
5.3.1 BYGGIUMSITING LANDSINS 41

**6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 43**

**6.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 43**
6.1.1 MENTAMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.09. 43
6.1.2 EFTIRÚTBÚGVING OG SKEIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.34. 43
6.1.3 LÆRARAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.2.07. 43
6.1.4 YMISKAR VERKÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.23. 44
6.1.5 BÓKASØVN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.3.01. 44
6.1.6 FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.3.13. 44
6.1.7 LISTASØVN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.3.22. 44
**6.2 MINNINÝTSLA 45**
6.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.14. 45
6.2.2 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 45
6.2.3 SERNÁMSDEPILIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.02. 46
6.2.4 SKÚLATILBOÐ TIL UNG VIÐ BREKI (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.06. 46
6.2.5 SKÚLADEPIL Í SUÐUROY (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.06. 46
6.2.6 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.07. 46
6.2.7 FISKIVINNUSKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.08. 46
6.2.8 SKÚLADEPIL Í MARKNAGILI (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.09. 47
6.2.9 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.14. 47
6.2.10 GJALD FYRI LÆRUSÁTTMÁLAR 7.23.3.15. 47
6.2.11 FERÐAENDURGJALD TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.18. 47
6.2.12 STUDENTASKÚLIN Í HOYDØLUM (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.28. 47
6.2.13 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (LØGUJÁTTAN) 7.23.6.03. 47
6.2.14 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.04. 48
6.2.15 UNGDÓMS- OG BYGDAHÚS 7.24.1.25. 48
6.2.16 BÓKASØVN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.02. 48
6.2.17 SAVNSHÚS (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.09. 48
6.2.18 KIRKJUBØMÚRURIN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.23. 48
6.2.19 STUÐUL TIL FRAMLEIÐSLU AV FØROYSKUM LOFTMIÐLATILFARI 7.24.4.10. 48
6.2.20 FØROYSK SJÓMANSKIRKJA 7.24.5.02. 48
6.2.21 ÍTRÓTTAANLEGG 7.24.6.12. 48

**7 INNLENDISMÁL 51**

**7.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 51**
7.1.1 LÁNSAFTURGJALD 15.11.2.07. 51
7.1.2 NÁTTÚRUFRIÐINGARNEVNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 15.30.1.07. 51
7.1.3 STRANDFARASKIP LANDSINS (LANDSFYRITØKA) 15.38.2.01. 51
**7.2 MINNINÝTSLA 52**
7.2.1 INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 15.11.1.39. 52
7.2.2 ÍTRÓTTAVEDDING 15.14.3.07. 53
7.2.3 STRANDFARASKIP LANDSINS (LØGUJÁTTAN) 15.38.2.02. 54

**8 ALMANNAMÁL 55**

**8.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 55**
8.1.1 ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.08. 55
8.1.2 TALGILD HEILSUSKIPAN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.41. 55
8.1.3 BARNAVERND (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.01. 55
8.1.4 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.05. 56
8.1.5 DAGPENINGASKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.4.01. 56
8.1.6 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.7.01. 56
8.1.7 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.05. 57
**8.2 MINNINÝTSLA 58**
8.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.10. 58
8.2.2 BØRN OG UNG (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.3.08. 58
8.2.3 SERFORSORG (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.01. 60
8.2.4 BÚSTOVNAR O.A. (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.02. 61
8.2.5 ELDRARØKT (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.04. 61
8.2.6 ELDRASAMBÝLI (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.16. 62
8.2.7 NÁMSFRØÐINGAR Í FRAMHALDSÚTBÚGVING (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.9.04. 62

**9 HEILSUMÁL 65**

**9.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 65**
9.1.1 APOTEKSVERKIÐ (LANDSFYRITØKA) 8.20.2.08. 65
9.1.2 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.04. 65
9.1.3 SØLA AV ÍBÚÐABYGNINGUM (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.05. 66
9.1.4 MEDICOTEKNISK TÓL (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.06. 69
9.1.5 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.10. 69
9.1.6 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.15. 69
9.1.7 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.20. 69
9.1.8 VIÐGERÐARSTOVNURIN HEILBRIGDI (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.4.02. 73
**9.2 MINNINÝTSLA 73**
9.2.1 HEILSUÁTØK 8.20.1.06. 73
9.2.2 APOTEKSVERKIÐ (LØGUJÁTTAN) 8.20.2.09. 73
9.2.3 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.08. 73

# 1 INNGANGUR

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðanina av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok lata Landsgrannskoðanini eina frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið frágreiðingarnar um frávik sambært landsroknskapinum 2006, og hevur síðani havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Í hesari frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki sær víst á og umrøtt stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismanni/aðalráði. Harumframt hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingini umrøtt onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Við hesum verður frágreiðingin latin løgtingsgrannskoðarunum sambært § 12 í grannskoðanarlógini, sjálvt um samlaða ársfrágreiðingin um grannskoðan av landsroknskapinum ikki er liðug. Hetta fyri at Tingið í størri mun kann nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina, sum sambært tingskipanini verður viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til Løgtingið.

Tórshavn, 19. oktober 2007

Leivur Harryson

# 2 Fíggjarmál

## 2.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Søla av partabrøvum í P/f Elektron | -5.000 | - | *5.000* |
| Toll- og Skattstova Føroya (rakstrarjáttan) | 60.562 | 61.275 | *713* |
| Nýggj fíggjarstýring (rakstrarjáttan) | 800 | 823 | *23* |
| Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) | 6.676 | 6.950 | *274* |
| Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) | 51.500 | 57.208 | *5.708* |
| FAS-endurgjald | 44.200 | 45.894 | *1.694* |

### *2.1.1 Søla av partabrøvum í P/f Elektron* 3.11.1.46.

Á fíggjarlógini 2006 er ein inntøkujáttan 5 mió.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri 1,9 mió.kr. í partabrøvum, sum landið eigur í P/f Elektron, og sum á fíggjarlógini 2006 og 2007 var mettur til 5 mió.kr.

Í oktober 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sølan er komin í drag, tí tað ikki er politisk semja í samgonguni um at selja partabrøvini.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er søluprísurin aftur mettur til 5 mió.kr. Sambært viðmerkingunum *"er hendan sølan ikki framd enn, men verður endaliga avgreidd í 2008. Høvuðsorsøkin til, at landið hevur ætlað at selt síni partabrøv í Elektron, er, at felagið er farið út í kapping á KT-marknaðinum. Fíggjarmálaráðið metir tað vera skeivt, at landið skal luttaka í kapping móti privatum KT-fyritøkum. Eisini er henda søla í tráð við einskiljingarætlanir Landsstýrisins."*

Landsgrannskoðanin kann viðmerkja, at landið eigur allan partapeningin í P/F Føroya Tele, ið nú eigur 55% av KT-fyritøkuni Formula.fo.

### *2.1.2 Toll- og Skattstova Føroya (rakstrarjáttan)* 3.15.1.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 60,6 mió.kr. Meirnýtslan er 713 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 60,1 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 455 t.kr., til at keypa og venja ein narkohund afturat og til at keypa ein bil. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 51.372 | 48.886 | *-2.486* |
| 24. EDV-skipanir hjá Toll- og Skattstovu Føroya | 6.500 | 9.359 | *2.859* |
| 26. Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum | 2.690 | 3.030 | *340* |
| **Tilsamans** | **60.562** | **61.275** | ***713*** |

Á talvuni sæst, at á undirkontu 20. "Vanlig virksemi" er ein minninýtslu 2,5 mió.kr., og á undirkontu 24. "EDV-skipanir hjá Toll- og Skattstovu Føroya" er ein meirnýtsla 2,9 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru inntøkur 2,6 mió.kr. av misgáum bókaðar á skeiva undirkontu.

### 2.1.3 *Nýggj fíggjarstýring (rakstrarjáttan)* 3.15.1.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 800 t.kr. Meirnýtslan er 23 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina *"hevur Landsstýrið tikið avgerð um at seta í verk mál- og avriksstýring fyri stovnar og játtanir undir landinum. Talan er um at gera leiðbeiningar á hesum øki og vera við til at ráðgeva stovnum, hvussu mál- og avriksstýring verður sett í verk. Ein ráðgevingarbólkur fer at samskipa verksetingina av mál- og avriksstýring. Í staðin fyri at seta fólk at fremja hesa tænastu, verður tænastan keypt frá privatum veitarum."*

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað til at keypa tænastur frá privatum veitarum, men umleið helmingurin av játtanini er farin til at endurrinda løn til fulltrúa á Gjaldstovuni. Sambært landsstýrismanninum kemst hetta av, at onnur verkætlan, sum viðkomandi arbeiddi við, kom í drag.

### 2.1.4 *Hagstova Føroya (rakstrarjáttan)* 3.15.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6.676 t.kr. Meirnýtslan er 274 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan hækkaðar lønarútreiðslur. Í fyrsta lagi fáa trý nýsett starvsfólk munandi betri løn enn tey, sum fóru úr starvi. Í øðrum lagi er ein av búskaparfrøðingunum settur sum serfrøðingur, og tað hevur ført til størri lønarútreiðslu. At enda hevur Hagstovan verið ov sein at søkja Barsilsskipanina um endurgjald fyri tann, sum settur var í staðin fyri kvinnu í barnsburðarfarloyvi.

### 2.1.5 *Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan)* 3.22.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 51,5 mió.kr. Meirnýtslan er 5,7 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 46.500 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 5.000 t.kr. vísandi til hægri rentustøði og økt útlán til bústaðarbygging og –keyp.

Sambært landsstýrismanninum var metingin aftan fyri eykajáttanina fyri september ov lág. Beinleiðis framskrivingin legði ikki upp fyri árligari eingangsinntøku frá DIS í juli 2006, um 1,4 mió.kr., og varandi hægra rentustøðinum frá august 2006. Onnur stóra meirnýtslan er ein avleiðing av, at Fíggjarnevnd Løgtingsins lækkaði játtanina við 11,5 mió.kr. Upprunauppskotið svaraði rættiliga neyvt til veruligu nýtsluna í 2006.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartøl fyri árini 2002–2006:

t.kr.

| | 2002[1] | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | Játtan 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul | 100.827 | 86.494 | 83.538 | 84.200 | 85.358 | 100.000 |
| Flyting frá kommunum | 31.136 | 28.069 | 27.152 | 27.775 | 28.165 | 33.300 |
| **Nettoútreiðslur** | **69.691** | **58.425** | **53.386** | **56.425** | **57.193** | **66.700** |

Spurdur, hvørjar fyritreytir játtanin 2007 byggir á, og um játtanin væntandi fer at halda, hevur landsstýrismaðurin svarað í oktober 2007, at fortreytirnar fyri játtanini í 2007 byggja á rentustøðið ultimo 2006 og táverandi vánir. Rentustøðið er hækkað síðani tá, og tí er biðið um eykajáttan 12 mió.kr., netto.

1 Í 2002 var stuðulin 42%. Síðani 2003 er stuðulin 40%.

Er endamálið við rentustuðlinum rokkið

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í januar 2007 reisti Landsgrannskoðanin m.a. spurningin, um endamálið við rentustuðlinum er rokkið:

> *Við Ll. nr. 148/1996 um "stuðul til rentuútreiðslur av lánum" varð rentufrádráttar-skipanin í skattinum løgd um til eina stuðulsskipan. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:*
>
> > "at rentufrádrátturin hevur leingi verið nýttur sum ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging. Í 80´árunum vóru nógv og stór lán veitt til nógv ymisk endamál, t.d. keyp av fleiri húsum, bilum, summarhúsum, uttanlandsferðir og aðra privatnýtslu. Landsstýrið ynskti ikki at stuðla hesi nýtslu skattliga og legði tí uppskot fyri Tingið í 1990 um at avtaka rentufrádráttin fyri øll lán uttan sethúsalán, lestrarlán og lán til innfrían av veðhaldi."
>
> *Eftir hesum at døma er rentustuðulin til sethúsalán ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging, og vóru avmarkingarnar gjørdar, tí Landsstýrið ikki framhaldandi ynskti at stuðla privatnýtslu.*
>
> *Sammett við siðvenju fyri bert fáum árum síðani, kemur í dag helst oftari fyri, at sethúsalán ikki verða goldin aftur. Talan er um lán, har 40% av rentuútreiðslunum verða latin sum rentustuðul frá landinum. Sum víst á frammanfyri, ber til at fáa rentustuðul í eitt óavmarkað tíðarskeið.*
>
> *Ein avleiðing av rentustuðlinum tykist sostatt vera, at fólk verða eggjað til ikki at rinda síni sethúsalán aftur, kanska heldur ikki renturnar. Eitt størri fíggjarligt rásarúm kann síðani verða brúkt til onnur endamál, m.a. privatnýtslu ella til uppsparing til eitt nú kapitalpensjón, ratupensjón ella íløgur í virðisbrøv o.t. Landsgrannskoðanin ivast í, um hetta var endamálið við at veita rentustuðul.*
>
> *"Landsgrannskoðanin heldur, at lógin um rentustuðul lýkur ikki krøvini til eina góða studningslóg. Endamálið við studninginum er ikki nóg greitt ella nóg neyvt, og ongar ábendingar eru um, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. Landsgrannskoðanin hevur mælt landsstýris-manninum til at viðgera henda spurning."*

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina september 2006 helt Fíggjarnevndin, at:

> *"tað tykist sum gongdin í Føroyum viðvíkjandi sethúsafígging alsamt meira líkist gongdini í grannalondum okkara, við tað at tað verður alsamt meira vanligt, at lán í sethúsum ikki verða niðurgoldin. Við verandi rentustuðli verður vanligt forbrúk sostatt stuðlað úr landskassanum. Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrismaðurin eigur sum skjótast at finna eina loysn, sum hevur eina breiða politiska semju."*

Í apríl 2007 spurdu vit, hvat er hent í málinum, og í juli 2007 svaraði landsstýris-maðurin:

> *"Landsstýrismaðurin er samdur við Landsgrannskoðanini í, at endamálið við rentu-stuðlinum er heldur ógreitt. Ásannast má eisini, at rentustuðulin í flestum førum ikki lættir um hjá sethúsaeigara, men ístaðin er vorðin ein fíggjarlig byrða hjá landskassa og kommunum. Henda gongd gerst týðiligari, nú tað verður meira vanligt, at sethúsalán í minni mun verða niðurgoldin, sum óbeinleiðis hevur við sær, at vanlig nýtsla verður stuðlað, og beinleiðis hevur við sær, at fíggjarliga byrðan hjá landskassa og kommunum veksur.*
>
> *Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at rentustuðulsskipanin eigur at verða endur-skoðað, har neyðugu atlitini verða tikin fyri fíggjarligu bindingunum, sethúsaeigarar hava langt fram í tíðina. Ásannast má, at tað neyvan verða gjørdar tær stóru broytingarnar í hesum valskeiðnum, eftirsum flest allir flokkar fóru til val við lyftinum um at varðveita rentustuðulsskipanina, og sum harafturat er ásett í samgonguskjalinum. Landsstýrismaðurin er tó sinnaður til í heyst at gera eina roynd at finna eina loysn, sum hevur breiða politiska semju."*

### *2.1.6 FAS-endurgjald* 3.35.1.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 44,2 mió.kr. Meirnýtslan er 1,7 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 24,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 20 mió.kr., vísandi til at FAS-endurgjaldið, vegna økt virksemi, hevur verið størri enn væntað.

Sambært landsstýrismanninum eru fleiri skip í FAS-skipanini, enn mett varð bæði á fíggjarlógini og eykajáttanarlógini september 2006.

## 2.2 Minninýtsla

### *2.2.1 Fíggjarmálaráðið (rakstrarjáttan)* 3.11.1.03.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 7.554 t.kr. Minninýtslan er 401 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 7.054 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 500 t.kr. til at gera kunngerðir o.a. í sambandi við nýggju játtanarlógina, ið varð løgd fyri Løgtingið 3. mars 2006.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina verður m.a. sagt, at *"Landsstýrismaðurin hevur upplýst, at upphæddin bert er til at seta nýggja játtanarskipan í verk og er ikki ætlað til at hækka játtanina til ráðið framyvir við hesi grundgeving. Játtanin verður tí treytað til nevnda endamál."*

Sum kunnugt fall lógaruppskotið um landsins játtanarskipan burtur.

### *2.2.2 Landsins ognir (rakstrarjáttan)* 3.11.1.23.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 240 t.kr. Meirinntøkurnar eru 1.296 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 20. Oljugoymslur o.a. | - | 1.200 | 1.200 |
| 21. Húsaleiga og íbúðargjald | 52 | 250 | 198 |
| 22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a. | -188 | -86 | -102 |
| Tilsamans | 240 | 1.536 | 1.296 |

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 *"er ætlanin at selja lendið til oljutangarnar í 2006. Orsakað av hesum fellur leiguinntøkan av lendi til oljutangar burtur."*

Sambært landsstýrismanninum vórðu oljutangarnir í Søldarfirði og Sørvági ikki seldir í 2006, og tískil varð ein leiguinntøka 1,2 mió.kr. Eisini var talan um 100 t.kr. í leiguinntøku fyrra hálvár frá Atlantsflog fyri hangarin, áðrenn ognin varð skotin inn í felagið.

Ætlaða sølan av oljutangunum er neyvari viðgjørd undir "sølu av landsins ognum" undir Vinnumálum.

### *2.2.3 Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan)* 3.21.7.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 307 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina varð mett, at útgjaldið úr Trygdargrunninum í mesta lagi fór at verða 0,5 mió.kr. í 2006.

Einki er goldið úr grunninum í 2006. Útreiðslurnar í 2006, 193 t.kr., eru eftirstøður, ið eru avskrivaðar, tí feløg eru strikað úr partafelagsskrásetingini.

Inniogn

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 umrøddi Landsgrannskoðanin inniognina hjá Trygdargrunninum. Í apríl 2006 vórðu 74,3 mió.kr. fluttar frá peningastovnskontum til kontu í Landsbankanum.

Spurdur, hvat ætlanin var við hesari peningaupphædd, svaraði landsstýrismaðurin í juni 2006:

*"Endalig avgerð er ikki tikin um henda spurning. Trygdargrunnurin er tikin inn í fíggjarlógina og tikin við í landsroknskapinum, og kundi hetta talað fyri at tikið peningin inn í landskassans vanliga gjaldføri, men ásannast má tó, at peningurin er kravdur inn við serligari løgtingslóg til serligt endamál. Inntil løgtingslógin um Trygdargrunnin møguliga verður broytt, haldi eg, at rættast er at hava nevndu upphædd setta til síðis."*

Landsgrannskoðanin spurdi síðani landsstýrismannin, nær støða fór at verða tikin til henda spurning.

Í oktober 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var í hesari tingsetuni at taka endaliga avgerð um at taka Trygdargrunnin av. Tað fór at hava við sær, at lógin um Trygdargrunnin varð tillagað soleiðis, at landið átók sær skyldurnar og yvirtók ognirnar.

Í apríl 2007 spurdu vit, hvat síðani er hent í málinum.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at enn er eingin endalig støða tikin í málinum, men verður tað vónandi gjørt í komandi tingsetu.

## 2.3 Rentur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur í 2006.

### *2.3.1 Rentur av landsins skuld* 20.50.1.

mió.kr.

| | Rentuútreiðslur 20.50.1. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentur at gjalda | 116,9 | 50,3 | -66,6 |
| | Tilsamans | 116,9 | 50,3 | -66,6 |

Á talvuni sæst, at rentuútreiðslur av landsins skuld eru heilar 66,6 mió.kr. lægri, enn mett varð.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur:

*"Lánið frá danska statinum er eitt annuitetslán yvir 20 ár, sum gongur út í 2018, við 5% p.a. í rentu. Árliga lánsgjaldið er 159,1 mió.kr. (avdráttur og renta). Í 2005 er avdrátturin 80,4 mió.kr. og rentan 78,7 mió.kr. Í 2006 verður avdrátturin 84,4 mió.kr. og rentan 74,7 mió.kr.*

*Samlaða brævaskuldin hjá landsstýrinum er nú 1,5 mia. kr. Lánsbrøvini ganga yvir 1 til 5 ár, og miðalrentan í 2005 er mett at verða 3,0% p.a., sum svarar til 53,1 mió.kr. Roknað verður við eini miðalrentu í 2006 á 3,5% p.a., sum svarar til 67,2 mió.kr.*

*Tilsamans eru rentuútreiðslurnar av skuld landskassans mettar til 131,8 mió.kr. í 2005 og 141,9 mió kr. í 2006. Við verandi lága rentustigi er ætlanin at umfíggja danska statslánið. Árliga sparingin verður mett til 25 mió.kr. Rentuútreiðslurnar verða tískil mettar til 116,9 mió.kr. í 2006."*

Sambært Fíggjarmálaráðnum væntaði Landsbankin, at miðalrentan av skuld landsins í 2006 fór at verða 3,5%. Rentulegan hækkaði so nógv í 2006, at landið fekk ein

kursvinning av skuldini uppá 77 mió.kr. við tí úrsliti, at miðalkostnaðurin gjørdist 1,3%.

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at *"talan er um "óneyðugar" bókingar av kursmunum, ið grugga tíðaravmarkanina av rentuútreiðslum millum árini."* Vit kunnu í hesum sambandi endurgeva viðmerkingar okkara í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 "um frávik millum játtan og nýtslu o.a.":

*"Broytingin í kursvirðinum á brævalánunum pr. statusdagin verður bókað sum kursmunur saman við rentuútreiðslunum. Hesin roknskaparháttur kann hava við sær ávís sveiggj í rentuútreiðslunum. Kursmunurin hevur ávirkað roknskapin 2005 við um 3,6 mió.kr. netto (inntøka), í 2004 var hinvegin talan um eina nettoútreiðslu um 17,5 mió.kr.*

*Hesin kursmunur er hvørki vinningur ella tap, uttan so at brævalán verða afturkeypt í úrtíð. Er tað ikki ætlanin, kann verða sagt, at talan er um "óneyðugar" bókingar av kursmunum, ið grugga tíðaravmarkanina av rentuútreiðslum millum árini. Tá brævalán er skrivað út og selt, veit Landsstýrið, hvønn kurs tað er selt fyri. Brævalánið skal rindast aftur til kurs 100, og tí kennir Landsstýrið eisini samlaða kursmunin. Hesin kursmunur kundi verið javnaður út liniert millum árini, brævalánið varir. Landsgrannskoðanin hevur tí reist spurningin, um ikki hesin bókingarháttur hevði verið rætta mannagongdin.*

*Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at talan er um eina roknskaparliga meginreglu, ið hevur verið nýtt í mong ár. Landsstýrismaðurin heldur tað ikki verða rætt at broyta roknskaparmeginreglu á hesum øki. Galdandi roknskaparregla gevur eina rættvísandi mynd av rakstri og fíggjarstøðu við ársenda."*

### ***2.3.2 Millumverandi við Tjóðbankan og Landsbankan*** 20.50.2.

mió.kr.

| | Rentuinntøkur 20.50.2. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentuinntøkur av innistandandi | -57,0 | -26,8 | 30,2 |
| 04. | Aðrar rentur | -5,0 | -6,6 | -1,6 |
| 07. | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | - | -8,4 | -8,4 |
| 10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | -22,0 | -15,9 | 6,1 |
| | Tilsamans | -84 | -57,7 | 26,3 |

<u>Undirkonta 01. Rentuinntøkur av innistandandi</u>

Størsta frávikið eru "Rentur av innistandandi", sum er 30,2 mió.kr. lægri enn mett varð.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur:

*"Landskassans rentuinntøkur av innistandandi í Landsbankanum vóru 43,2 mió.kr. í 2004. Mett verður, at rentuinntøkurnar í 2005 eisini eru 43,2 mió.kr. innroknað mettu rentuinntøkuna á 1,5 mió.kr. frá Trygdargrunninum. Mett verður, at rentuinntøkur landskassans av hesi høvuðskontu fara at verða 30,5 mió.kr. í 2006. Orsøkirnar til hesa stóru lækking er, at roknað verður við ávísum kurstapi fyri plaseringarnar.*

*Av tí, at Landsbankin ætlandi verður uppræ私taður við rakstrarjáttan í 2006 verður ikki longur 1%-stig frádrigið rentuinntøkunum til raksturin av Landsbankanum og verður tískil mett, at rentuinntøkurnar av innistandandi verða 57 mió.kr. í 2006."*

Sambært Fíggjarmálaráðnum hevði Landsbankin væntað hækkaða rentulegu, soleiðis at landið fór at fáa 2,25% í beinleiðis rentu úr Landsbankanum, meðan beinleiðis rentan í roknskapinum svarar til 2,1%. Játtanin í 2006 er merkt av bruttofisering, t.v.s. beinleiðis rentu frá landsbankanum + rentumun til Landsbankan, meðan roknskapurin einans vísir beinleiðis rentu.

Landsbankin hevur tí ikki brúkt somu væntan um rentuhækkan fyri rentuútreiðslur sum fyri rentuinntøkur. Á fíggjarlógaruppskotinum 2007 eru somu marknaðarfortreytir nýttar.

Undirkonta 07. Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya

Talan er um eina inntøku 8,4 mió.kr.

Sambært viðmerkinginum til fíggjarlógina varð eingin inntøka ásett í 2006, *"tí Landsbankin ætlandi verður upprættaður við rakstrarjáttan í 2006."*

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann arbeiddi við einari grundleggjandi umskipan av virkseminum hjá Hagstovuni, Landsbankanum og Búskaparráðnum. Fíggjarmálaráðið var liðugt at evna til lógaruppskot at fremja nevndu umskipan.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað eydnaðist ikki at fáa politiska undirtøku fyri samanleggingini av stovnunum við játtan á fíggjarlóg. Arbeitt verður tó framvegis við, at stovnarnir verða bygnaðarliga samskipaðir undir somu lon.

## 2.4 Inntøkur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2006.

### 2.4.1 *Skattainntøkur* 20.52.1.

mió.kr.

| | Skattainntøkur 20.52.1. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Vanligur landsskattur | 1.250,0 | 1.380,4 | 130,4 |
| 06. | Kolvetnisskattur, persónar | 5,0 | 0,5 | -4,5 |
| 07. | Felagsskattur | 100,0 | 142,0 | 42,0 |
| 08. | Kolvetnisskattur, feløg | 1,0 | 1,1 | 0,1 |
| 11. | Kapitalvinningsskattur | 45,0 | 56,4 | 11,4 |
| 13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | 10,0 | 11,6 | 1,6 |
| 25. | Arvaavgjald | 4,0 | 6,0 | 2,0 |
| 28. | Gjald til barsilsskipanina | 74,4 | 80,5 | 6,1 |
| 30. | Gjald frá Búnaðarstovuni | 2,7 | 2,4 | -0,3 |
| | **Tilsamans** | **1.492,1** | **1.680,9** | **188,8** |

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 1.250 mió.kr. á undirkonta 01. "Vanligur landsskattur". Upprunaliga vóru játtaðar 1.225 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 25 mió.kr. vísandi til, at meirinntøkurnar frá FAS-skipanini fóru at verða 25 mió.kr.

Størstu frávikini eru "Vanligur landsskattur" og "Felagsskattur", sum eru ávikavist 130,4 mió.kr. og 42,0 mió.kr. hægri, enn mett varð.

Sambært landsstýrismanninum var í 2006 eitt rættiligt lop í inntøkum landskassans, tá samlaði inntøkuvøksturin var 8 ferðir so stórur, sum árið fyri. 2006 var eitt óvanligt ár, við metstórum vøkstri, sum sæst aftur á øllum økjum í samfelagnum. Ein týðandi orsøk til stóra vøksturin í virkseminum og nýtsluni 2006 er nýggju fíggingartilboðini og kappingin millum føroysku peningastovnarnar, sum byrjaði síðst í 2005 og rættiliga kom í hæddina í 2006. Stóri bráðvøksturin í 2006 var orsøkin til, at metingin av vanliga landsskattinum og felagsskattinum á fíggjarlógini 2006 var ov lág.

## 2.4.2 *Avgjøld og tollur* 20.52.2.

mió.kr.

| | Avgjøld og tollur 20.52.2. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Meirvirðisgjald | 995,0 | 1.148,8 | 153,8 |
| 04. | Tollavgjald | 30,0 | 40,3 | 10,3 |
| 07. | Punktgjald | 185,0 | 175,6 | -9,4 |
| 10. | Lønhæddargjald | 12,0 | 13,7 | 1,7 |
| 13. | Brennioljugjald | 65,0 | 61,8 | -3,2 |
| 16. | Framleiðsluavgjald | 20,0 | 19,5 | -0,5 |
| 19. | Skrásetingargjald | 90,0 | 144,7 | 54,7 |
| 22. | Vegskattur (vektgjald) | 77,0 | 77,7 | 0,7 |
| 25. | Ferðaavgjald | 11,0 | 13,1 | 2,1 |
| 28. | Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | 2,2 | 1,8 | -0,4 |
| | **Tilsamans** | **1.487,2** | **1.697** | **209,8** |

Størstu frávikini eru “Meirvirðisgjald” og “Skrásetingargjald”, sum eru ávikavist 153,8 mió.kr. og 54,7 mió.kr. hægri, enn mett varð.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til bráðvøksturin í avgjaldsinntøkunum í 2006 nýggju fíggingartilboðini og kappingin millum føroysku peningastovnarnar, sum byrjaði síðst í 2005 og rættiliga kom í hæddina í 2006. Stóri vøksturin í nýtsluni sæst serliga aftur í eftirspurninginum eftir bilum og øðrum dýrum nýtsluvørum. Tí eru inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi og skrásetingargjaldi hægri, enn mett varð.

## 2.4.3 *Ymsar inntøkur* 20.52.3.

mió.kr.

| | Ymiskar inntøkur 20.52.3. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 60,0 | 60,0 | - |
| 04. | Útluting frá almennum partafeløgum | 20,0 | 40,1 | 20,1 |
| 10. | Aðrar inntøkur | 10,3 | 20,1 | 9,8 |
| | **Tilsamans** | **90,3** | **120,2** | **29,9** |

Undirkonta 04. Útluting frá almennum partafeløgum

Talan er um vinningsbýti frá hesum partafeløgum:

| | |
|---|---|
| P/f Atlantic Airways | 10,0 mió.kr. |
| P/f Telefonverkið | 30,0 mió.kr. |
| P/f Tjaldur | 0,1 mió.kr. |
| Tilsamans | 40,1 mió.kr. |

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 12. januar 2007 umrøddu vit m.a., at *“kapitalvinningsskattur er ikki goldin síðani 2002 av vinningsbýti, sum er goldið landinum. Lógin um kapitalvinningsskatt, sum varð sett í gildi í november 2001, er galdandi fyri vinningsbýti útlutað eftir 16. november 2001. Vit hava mælt Fíggjarmálaráðnum til at kanna, um henda mannagongd er røtt.”*

Í juli 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært ásetingini í § 9 í kapitalvinningsskattalógini frá 21. desember 2001, skulu feløg og grunnar o.o., sum eru skattskyldug í Føroyum, og sum eiga partapening ella innskotspening í tí útlutandi

felagnum, ikki gjalda skatt av vinningsbýtinum. Tí skal Fíggingargrunnurin ikki gjalda skatt av vinningsbýtinum frá Føroya Banka.

Sambært landsstýrismanninum er galdandi, at landskassin er frítikin fyri skatt-skyldu, tá Fíggingargrunnurin útlutar víðari til landskassan, sambært § 3, stk. 1, litra c, í skattalógini. Sama er galdandi fyri útluting frá øðrum feløgum og grunnum, so sum Føroya Tele og Atlantic Airways.

### *2.4.4 Aðrar inntøkur* 20.52.3.10.

t.kr.

| | Aðrar inntøkur 20.52.3.10. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Loyvisgjald | 50 | 0 | -50 |
| 02. | Skeinkiloyvi, avgjald | 65 | 53 | -12 |
| 04. | Navnaprógv | 10 | 12 | 2 |
| 05. | Bøtur | 1.000 | 38 | -962 |
| 07. | Burturlutingargjald | 1.100 | 903 | -197 |
| 09. | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 75 | 111 | 36 |
| 11. | Víddargjald | 6.000 | 7.122 | 1.122 |
| 13. | Afturgjald vegna skuldarumskipan | 2.000 | 0 | -2.000 |
| 60. | Óvanligar inntøkur | - | 11.823 | 11.823 |
| | **Tilsamans** | **10.300** | **20.062** | **9.762** |

Størstu frávikini eru "Óvanligar inntøkur" og "Afturgjald vegna skuldarumskipan", sum eru ávikavist 11.823 t.kr. hægri og 2.000 t.kr. lægri, enn mett varð.

Undirkonta 13. Afturgjald vegna skuldarumskipan

Sambært landsroknskapinum eru ongar inntøkur í 2005 og 2006.

Í oktober 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sum nú sá út, kom einki inn á hesari inntøkujáttan, tí játtanin fevndi bert um aðra skuld til landskassan enn skatt og mvg. Higartil høvdu skuldarumskipanirnar, sum fyri tað mesta vóru vinnulán og veðhald, ikki givið grundarlag fyri afturgjaldi, og hildið varð heldur ikki, at tær fóru at geva nakað í framtíðini. Tó er í nøkrum førum pant tikið í ogn, sum tó ikki fellur til gjaldingar, fyrr enn ognin verður seld ella búgvið skift. Nakað av peningi fór helst at koma inn í skatti og mvg, men hesin peningur verður skrásettur sum minking av avseting móti tapi á ávikavist høvuðskontum 20.52.1.01. "Vanligur landsskattur" og 20.52.2.01. "Meirvirðisgjald".

Í fíggjarlógini 2007 er ikki roknað við nakrari inntøku á hesari kontu.

Undirkonta 60. Óvanligar inntøkur

Høvuðskontan "Óvanligar inntøkur" verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða bókaðar aðrastaðni.

Talan í 2006 er um afturføring av havnagjøldum, sum Strandfaraskip Landins hevði sett av í 2003-2005 ímóti krøvum frá Tvøroyrar og Vestmanna kommunum um økt havnagjøld. Strandferðslan vann rættarmál í Landsrættinum um krav frá Tvøroyrar kommunu og gjørdi semju við Vestmanna kommunu. *Málið er nærri viðgjørt undir "Strandfaraskip Landsins" undir Innlendismálum.*

### 2.4.5 *Heildarveiting o.t*. 20.54.1.

mió.kr.

| | Heildarveiting o.t. 20.54.1. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Heildarveiting | 615,5 | 615,5 | - |
| 02. | Endurgjøld | 15,0 | 16,5 | 1,5 |
| | Tilsamans | 630,5 | 632,0 | 1,5 |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit eitt endurgjald frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Hetta endurgjald var ikki komið við í roknskapin árini frammanundan, m.a. tí samskiftistrupulleikar høvdu verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvar endurgjaldsuppgerðin skuldi sendast. Talan var um mett endurgjald 3 mió.kr. fyri tíðarskeiðið 1. januar 1977 – 31. desember 2004.

Í september 2005 spurdi Landsgrannskoðanin, nær upphæddin fór at verða goldin.

Í oktober 2005 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at Føroya Gjaldstova í næstum fór at gera kravið galdandi.

Í apríl 2007 spurdu vit, hvat síðani var hent í málinum.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at *"kravið er og verður árliga gjørt galdandi, men at tað hongur í fíggjarstøðuni, eftirsum tað ikki higartil er goldið av danska statinum. Tað er líkt til, at hjá donsku myndugleikunum valdar óvissa, bæði um rættleikan av endurgjaldskravinum og síðani eisini um, hvør stovnur/játtan skal halda útreiðslurnar."*

### 2.4.6 *Serinntøkur, útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992* 53.52.3.

mió.kr.

| | Serinntøkur 53.52.3.02. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 535,0 | 535,0 | - |
| | **Tilsamans** | **535,0** | **535,0** | **-** |

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 535 mió.kr. Á fíggjarlógini 2006 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 vórðu játtaðar 535 mió.kr. til inntøkur, vísandi til at kapitalbygnaðurin í P/F Føroya Banka skuldi tillagast, áðrenn bankin varð lýstur til sølu.

## 2.5 <u>Aðrir viðmerkingar</u>

### 2.5.1 *Ógreiða um játtanir til felags viðlíkahald*

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 26. oktober 2006 umrøddu vit á s. 18-21 ógreiðu um játtanir til felags viðlíkahald.

Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at á flestu málsøkjum eru játtanir, sum eru markaðar til felags viðlíkahald. Víst varð á, at hesar játtanir í ávísan mun verða brúktar til at keypa vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald. Skipanin, at hava eina felags játtan á einum málsøki til viðlíkahald, byrjaði sum ein kreppuloysn við uppskotinum til fíggjarlógina 1994. Minkandi játtanir høvdu tá ført til, at viðlíkahald av bygningum ofta varð spart burtur, og fleiri bygningar vóru í ringum standi.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt í oktober 2006, at tørvur framvegis er á tílíkum felags játtanum. Landsstýrismaðurin er samdur í, at tað er ov tilvildarligt og ógreitt, hvat verður bókað sum felags viðlíkahald. Fleiri av dømunum um viðlíka-haldsútreiðslur, sum nevnd eru í frágreiðingini, eru at rokna sum vanlig keyp av útbúnaði ella afturvendandi keyp av tænastum, ið av røttum skuldu verið skrásett

undir vanligum rakstri. Tað kundi talað fyri, at tørvur er á einari reglugerð, sum útgreinar, hvat kann verða skrásett sum viðlíkahald. Sambært landsstýrismanninum er tað ein uppgáva hjá Fíggjarmálaráðnum, men hann heldur tað vera týdningarmikið, at Byggiumsiting Landsins tekur lut í hesum arbeiði.

Í apríl 2007 spurdu vit, hvat síðani er hent í málinum.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at enn er eingin reglugerð gjørd, men tað frítekur ikki stovnsleiðarum at nýta vit og skil í sambandi við skráseting av útreiðslum á viðlíkahaldsjáttanunum. Fíggjarmálaráðið heldur framvegis, at tørvur er á einari reglugerð, men heldur ikki málið hava hægstu raðfesting.

### 2.5.2 Fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar

Á s. 21 - 23 í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 26. oktober 2006 "um frávik millum játtan og nýtslu o.a." stendur m.a.:

*"Undir "Útbúgving og Gransking", hevur Landsgrannskoðanin m.a. víst á, at samanumtikið ivast vit í, um játtanin til umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur til Mentamálaráðið í nóg stóran mun er gjøgnumskygd. Vísandi til viðmerkingar okkara til høvuðskontu:*

- *7.11.1.14. "Viðlíkahald",*
- *7.23.1.07. "Ymsar felagsútreiðslur",*
- *7.23.2.01. "Fólkaskúlin" og*
- *7.23.1.31. "Próvtøkur"*

*verður spurningurin eisini reistur, um játtanin til sjálvt "Mentamálaráðið" í veruleikanum átti at verið einari 4-5 mió.kr. hægri.*

*Eisini á øðrum málsøkjum er spurningurin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur umrøddur, og Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag gjørt fleiri stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur á einum stovni saman við øðrum játtanum, ið ein stovnur umsitur."*

Landsgrannskoðanin helt ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, tá ið ein stovnur ella aðalráð spjaðir fyrisitingarútreiðslur á aðrar játtanir, ið stovnurin/aðalráðið hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Eisini Gjaldstovan helt seg síggja oftari, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, leggja fyrisitingarútreiðslur undir hesar játtanir. Úrslitið er, at fyrisitingarútreiðslurnar ikki geva røttu myndina av, hvat fyrisitingin veruliga kostar, og søguligar samanberingar, sum er tað týdningarmesta politiska stýringaramboðið, verða eisini órógvaðar.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt eisini í oktober 2006, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun eiga at verða savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið mælti til, at umrøddu høvuðskontur og aðrar verða gjøgnumgingnar fyri at fáa staðfest, í hvønn mun fyrisitingarútreiðslur eru á hesum játtanum, og um hesar útreiðslur eiga at verða fluttar til avvarðandi aðalráð.

Í apríl 2007 spurdu vit landsstýrismannin í fíggjarmálum, hvat var hent í málinum. Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Fíggjarmálaráðið fer ætlandi at taka henda spurning upp við hini aðalráðini í sambandi við gerð av fíggjarlógaruppskotinum 2008.

# 3 LØGMANSFYRISITINGIN

## 3.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Stjórnarskipanarnevnd (rakstrarjáttan) | 1.350 | 1.442 | *92* |
| Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) | 4.700 | 4.886 | *186* |
| Sendistovur (rakstrarjáttan) | 7.824 | 7.886 | *62* |

### *3.1.1 Stjórnarskipanarnevnd (rakstrarjáttan)* 2.11.1.40.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.350 t.kr. Meirnýtslan er 92 t.kr.

### *3.1.2 Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan)* 2.12.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 4.700 t.kr. Meirnýtslan er 186 t.kr.

### *3.1.3 Sendistovur (rakstrarjáttan)* 2.13.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 7.824 t.kr. Meirnýtslan er 62 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 7.304 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 520 t.kr. til eitt starvsfólk afturat á sendistovuni í Brússel at byrja 1. september 2006.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 22. Sendistova Føroya í Evropasamveldinum | 2.574 | 2.527 | *-47* |
| 22. Sendistova Føroya í Keypmannahavn | 2.630 | 2.831 | *201* |
| 23. Sendistova Føroya í London | 2.520 | 2.487 | *-34* |
| 24. Sendistovur felags umsiting | 100 | 42 | *-58* |
| **Tilsamans** | **7.824** | **7.886** | ***62*** |

Í skrivi til Fíggjarnevndina 20. apríl 2006 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at:

> *"Landsstýrinum stendur í boði at keypa ein bygning í Brússel, sum kann verða sendistova og bústaður hjá sendimanni Føroya.*
>
> *Um landsstýrið skuldi gjørt hesa íløgu, verður mett, at játtast skulu uml. 16 mió kr, harav 4 mió.kr. fara til umvælingar og innrætting.*
>
> *Hóast tað kann tykjast dýrt at nýta 16 milliónir krónur til egin hølir í Brússel, kann eitt húsakeyp tó helst í longdini verða ein fíggjarlig sparing við lægri rakstrarútreiðslum, samstundis sum eitt húsakeyp uttan iva betrar um umstøðurnar hjá sendistovu Føroya í Brússel."*

Í áliti sínum 28. apríl 2006 helt Fíggjarnevndin, *"at hetta er ein kostnaðarmikil háttur at reka sendistovur. Nevndin heldur, at løgmaður eigur at hyggja eftir øðrum møguleikum og kanna, í hvønn mun tað ber til at eiga í staðin fyri at leiga hølir til sendistovur."*

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, og hvørjar ætlanir løgmaður hevur, hevur Løgmansskrivstovan í juni 2007 boðað frá, at arbeitt verður enn við málinum at bøta um umstøðurnar á Sendistovu Føroya í Brússel. Mest sannlíkt verður talan um at leiga hóskandi hølir.

## 3.2 Minninýtsla

### *3.2.1 Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan)* 2.11.1.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 13.273 t.kr. Minninýtslan er 183 t.kr.
Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 11.823 | 12.390 | *567* |
| 25. Altjóðagerð | 500 | 601 | *101* |
| 26. Einskiljing | 1.000 | 96 | *-904* |
| 30. Fyrisiting av menningarhjálp | - | 3 | *3* |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | -50 | - | *50* |
| **Tilsamans** | **13.273** | **13.090** | ***-183*** |

Undirkonta 26. Einskiljing

Í fíggjarlógina 2006 eru hesar viðmerkingar:

*"Landsstýrið hevur í hyggju at einskilja fleiri fyritøkur í 2006. Áðrenn ein fyritøka kann einskiljast, skulu fleiri fyrireikingar gerast. Summar kunnu gerast av fyrisiting landsstýrisins, meðan aðrar skulu gerast av serkønum ráðgevarum. Ætlanin er, at landsstýrismaður, samstundis sum hann leggur mál fyri Løgtingið um einskiljing av fyritøku, leggur uppskot um eykajáttan til kostnað av serkønari fíggjarligari og løgfrøðiligari ráðgeving. Neyðugt er tó í ávísum føri at keypa ráðgevatænastur til tað lógarfyrireikandi arbeiðið, og tí er neyðugt við hesi játtan. Torført er at meta um hendan fíggjartørv, men játtaðar eru 1 mió.kr. til endamálið í 2006."*

Sambært landsroknskapinum er í 2006 talan um hesar útreiðslur:

kr.

| | |
|---|---|
| Ferðing og flutningur, alment sett – uttanlands | 29.027 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 5.300 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 61.975 |
| **Tilsamans** | **96.302** |

Í fíggjarlógina 2007 eru m.a. hesar viðmerkingar til undirkontu 26:

*"Í fjør varð peningur játtaður til hetta endamál á undirkontu 26, men av tí at hetta virksemi er ein samrunnin partur av virkseminum í Løgmansskrivstovuni, er henda játtan nú flutt inn undir undirkontu 20. Vanligt virksemi."*

## 3.3 Aðrar viðmerkingar

### *3.3.1 Menningarhjálp* *2.13.3.04.*

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.500 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru brúktar tilsamans 3.176 t.kr. Av teimum eru 2.973 t.kr. stuðulsveitingar og 203 t.kr. rakstrarútreiðslur.

**Stuðulsveitingar**

Sambært landsroknskapinum er játtanin nýtt til at stuðla hesum tiltøkum:

kr.

| | |
|---|---:|
| 1. World Food Programme: Gambia | 1.300.000 |
| 2. Mercy Corps: Indonesia | 1.000.000 |
| 3. World Bank: Palau | 649.762 |
| 4. Care-Peru | 23.358 |
| **Tilsamans** | **2.973.120** |

Ad 1.: World Food Programme: Gambia

Í desember 2006 kunnaði løgmaður í tíðindaskrivi um, at Landsstýrið hevði latið ST-stovninum World Food Programme 1,3 mió.kr. til eina langtíðar menningarverkætlan “Food For Education”, sum World Food Programme hevði sett í verk í Gambia í 2003. Átakið tryggjar, at skúlabørnini fáa eina máltíð dagliga, samstundis sum tey læra at lesa og rokna.

Ad 2. Mercy Corps: Indonesia

Stuðulin er til heilsuverkætlan í Indonesia. Sambært tilmæli í november 2006 frá Uttanríkisdeildini er endamálið við verkætlanini:

- *at* økja um talið á kvinnum, sum geva nýføddu børnum sínum móðurmjólk,
- *at* skapa eitt umhvørvi, sum stuðlar bróstageving, og at broyta hugburðin viðvíkjandi móðurmjólk sum heild,
- *at* økja um vitanina hjá fólki, sum arbeiða hjá DHO (District Health Office) um fyrimunirnar við at geva móðurmjólk.

A 3. World Bank

21. september 2006 skrivaði løgmaður undir sáttmála við Heimsbankan um at gjalda 115.000 US $ til eina verkætlan, ið snýr seg um at stuðla oyggjalandinum Palau í at menna eina oljulóggávu.

Ad 4. CARE -Peru

Í september 2006 kunnaði løgmaður í tíðindaskrivi um, at ein verkætlan í Peru, eftir gjølligari metingum og eftir at hava ráðført seg við serfrøðina, var slept. Verklætlanin hevði til endamáls at gera proteinríkt kostískoyti úr høgguslokki.

Vit spurdu, hvussu stórur samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina í Peru hevur verið.

Í juni 2007 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at tilsamans vóru umleið 400.000 kr. brúktar í 2005 og 2006 uppá menningarsamstarv í Peru.

Av teimum eru um 175.000 kr. farnar til ráðgevingartænastu (løn til ráðgeva, advokattænastu, starvsstovukanningar o.a.), um 190.000 kr. eru farnar til ferða-útreiðslur í.s.v. ferðina til Peru í september 2005. Eisini eru 25.000 kr. goldnar CARE-Peru fyri teirra frágreiðing í.s.v. Pota-verkætlanina.

Vit spurdu Løgmansskrivstovuna, hví verkætlanin varð slept.

Løgmansskrivstovan vísti á, at ein forkanning hjá Care Peru hevði staðfest, at verkætlanin varð ikki hildin at skapa nógv arbeiðspláss, sosialu árinini vóru avmarkað, og hon varð sum heild hildin at hóska seg betur sum ein kommersiell verkætlan.

Barnaheim á Sri Lanka

Í juli 2005 samtykti Løgmansskrivstovan at játta felagnum Barnabata 1,7 mió.kr. til at byggja barnaheim á Sri Lanka.

Grundarlagið fyri stuðlinum er eitt skjal frá 16. desember 2005 við heitinum "Stuðulstilsøgn", har Landsstýrið letur stuðulin við støði í einari verkætlanarlýsing, "umsókn um at byggja barnaheim til heimleys børn á Sri Lanka", sum Landsstýrið hevði fingið 14. desember 2005.

Vit spurdu, um Løgmansskrivstovan hevði útvegað sær roknskap ella avrit av skjølum, ið kundu sanna, at peningurin var nýttur til endamálið.

Í juni 2007 hevur Løgmansskrivstovan svarað:

*"Verkætlanin hjá Barnabata á Sri Lanka var eitt úrslit av eykajáttan latin eftir Tsunami flóðalduna og var sostatt játtað, áðrenn LMS av álvara var farin undir at arbeiða við altjóða menningarsamstarvi. Verkætlanin varð síðan partur av málsøkinum menningarsamstarv, tí tað vísti seg, at tørvur var ikki á so nógvum pengum til bráðfeingis neyðhjálpararbeiðið til Tsunami-raktu økini, sum upprunaliga var hildið, og tí varð avgjørt, at henda verkætlan kundi geva einum føroyskum felagsskapi sum Barnabata møguleikan fyri at standa fyri eini menningarverkætlan.*

*Rætt er, at tað hevði verið skilabetri at veitt eina bindandi tilsøgn um stuðul, ið síðani kundi verið útgoldin eftir nærri ásettum treytum. Hetta er, sum nevnt, síðani vorðið partur av umsitingarrreglunum, men tá var økið heilt nýtt, og ongar mannagongdir vóru skipaðar á økinum.*

*LMS hevði tó tryggjað sær at fáa stuðulin afturrindaðan, um verkætlanin ikki varð til nakað, ella um mett varð, at Barnabati ikki var ført fyri at útinna verkætlanina. LMS hevur haft regluligar fundir við Barnabata og fingið regluligar frágreiðingar um gongdina í málinum, men enn er onki brúkt av peninginum, annað enn um 150.000 til eina ferð til Sri Lanka. Barnabati hevur rent seg inn í trupulleikar av allahandaslag gjøgnum hesi skjótt tvey árini, síðan tey av fyrstan tíð fingu tilsøgn um stuðul, og tí er enn ongin peningur farin víðari til ætlaðu verkætlanina.*

*Eftir at nevndin á aðalfundinum 15. maj í 2007 gjørdist meira skerd og lyklapersónar, ið hava verið við í Sri Lanka verkætlanini frá byrjan, hava tikið seg úr, hevur LMS steðgað avtaluni við Barnabata og biðið tey um at flyta peningin aftur til Landsstýrið. Hetta hevur Barnabati játtað."*

**Stuðulsumsiting//tíðaravmarking**

Felags fyri menningarhjálpina er, at stuðulin er goldin út stutt fyri árslok:

- World Food Programme, Gambia. Upphæddin 1,3 mió.kr. varð rindað ST-stovninum 24. november 2006.
- Mercy Corps: Indonesia. Upphæddin 1 mió.kr. varð rindað Mercy Corps 22. desember 2006.
- World Bank: Palau. Upphæddin 650 t.kr. varð rindað Heimsbankanum 29. desember 2006.
- Barnaheim á Sri Lanka. Ein restupphæddina 1,3 mió.kr. varð rindað Barnabata 16. desember 2005.

Tað kundi bent á, at størsti parturin av játtanini er goldin frammanundan til at nýta eftirfylgjandi fíggjarár. Í apríl 2007 bóðu vit um eina frágreiðing.

Í juni 2007 hevur Løgmansskrivstovan svarað:

*"Tað er rætt, at størsti parturin av stuðlinum latin í 2006, varð útgoldin stutt fyri árslok. Hetta er tí, at allar avtalur um verkætlanirnar vóru ikki liðugt samráddar fyrr enn fram*

*móti heystinum, tískil passaði tað soleiðis. Heldur ikki var nøkur lógarheimild at arbeiða eftir fyrr enn í maj/juni 2006, tí táverandi lóg fór úr gildið 31. des 2005, og nýggja lógin varð ikki samtykt av Løgtinginum fyrr enn seinast í maj mánaði.*

*Tað er neyðugt at bóka allar útreiðslurnar í tí árinum, tá stuðulin verður latin. Hetta hóast stuðulin verður nýttur av móttakandi felagsskapinum yvir eitt ella tvey ár. Tað ber ikki til at arbeiða við slíkum verkætlanum, um ikki peningurin kann verða goldin frammanundan, fyri síðan at verða brúktur gjøgnum tað tíðarskeiðið, verkætlanin ætlandi varir. Tó veitir kunngerðin, sum í næstum verður lýst, heimild til "í kostnaðarkrevjandi verkætlanum kann verða sett sum treyt, at stuðul skal verða latin í fleiri gjøldum." (grein 3, stk. 2). Verandi játtanarskipan loyvir harumframt ikki, at flutt verður tvørturum ár, og tí er eisini neyðugt at arbeiða, sum vit gera. Um nýggj játtanarskipan verður viðtikin, vænta vit, at hon verður generel, soleiðis at hon eisini kemur at fevna um hetta øki.*

*Løgmansskrivstovan tryggjar seg við at fáa regluligar frágreiðingar og grannskoðaðan roknskap bæði ávegis, og tá verkætlanin er liðug. Hesir stóru felagsskapir (WFP, Mercy Corps og World Bank) hava fastar mannagongdir fyri rapportering, sum allir donorar noyðast at góðtaka. Hetta hava vit kannað hjá Danida og aðrastaðni."*

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Sum Løgmansskrivstovan vísir á, verða verandi játtanarreglur hildnar at vera darvandi fyri stuðulsumsitingina. Heimild er ikki at bóka eina tilsøgn um stuðul í einum seinni fíggjarári sum útreiðslu, og eitt forútgjald uppá ein stuðul í einum seinni fíggjarári, kann vanliga heldur ikki verða bókað sum útreiðsla.

Sum greitt frá, tykist Løgmansskrivstovan hava toygt hesar reglur og rindað út stuðul, áðrenn hann var búgvin til útgjaldingar, hetta helst fyri at kunnu útreiðsluføra peningin fyri árslok, so játtanin ikki "fellur aftur til landskassan".

Eitt av dømunum er umrødda játtan til barnaheimið í Sri Lanka, sum í desember 2005 varð flutt inn á eina bankakontu hjá Barnabata og bókað sum ein útreiðsla í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin heldur ikki tílíka mannagongd vera skilagóða, og vanliga er ikki heimild til tess.

Vit vístu í apríl 2007 á, at vil Løgmansskrivstovan hava aðrar játtanarreglur, so ber til at broyta lógina um menningarhjálp, soleiðis at heimild verður at bóka eina tilsøgn sum útreiðslu uttan at skula rinda peningin til stuðulsmóttakaran frammanundan. Vit vístu í hesum sambandi á § 24, stk. 3, í uppskotinum til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan":

*Sama um gjald heilt ella fyri ein part verður goldið í einum seinni fíggjarári,* ***so verða tilsagnir um stuðul og lán útreiðsluførdar í tí fíggjarári, tá ið bindandi tilsøgn er givin****.* ***Tilsagnarupphæddir, ið ikki eru útgoldnar við ársenda, verða fluttar til fíggjarstøðuna, har tær standa støðlaðar, til tilsøgnin endaliga verður avgreidd****.*

Landsgrannskoðanin heldur tað hevði verið skilagott, um ein tílík áseting varð sett í lógina um altjóða menningarsamstarv. Vit halda ikki heimild vera í verandi lóg at áseta tílíkar reglur í kunngerð.

Í svarskrivi sínum í september 2007 heldur løgmaður eisini, at tað hevði verið skilagott at sett eina tílíka áseting í lógina um altjóða menningarsamstarv, og Løgmansskrivstovan arbeiðir í løtuni við at fáa hesa broyting framda sambært tilmælinum frá Landsgrannskoðanini.

**Rakstrarútreiðslur**

Sambært landsroknskapinum er játtanin eisini nýtt til hesar rakstrarútreiðslur:

| | |
|---|---|
| Løn | 4.819 kr. |
| Ferðing og flutningur, uttanlands | 81.875 kr. |
| Sakkøn hjálp | 99.450 kr. |
| Umboðan | 1.166 kr. |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 15.366 kr. |
| Tilsamans | 202.676 kr. |

Ferðing og flutningur, uttanlands

Ferðaúreiðslurnar eru fyri tvey starvsfólk á Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni. Talan er m.a. um ferðir til ávikavist Edinburgh (Skotland), New York (U.S.A.), og Malawi um Johannesburg (Suðurafrika).

Spurd um endamálið við ferðunum, og hvat kom burtur úr, svaraði Løgmansskrivstovan í juni 2007:

*"Ferðin til Edinburgh hevði til endamáls at styrkja samstarvið við felagsskapin Mercy Corps, sum vit nú luttaka í fleiri verkætlanum saman við. Eftir hesa ferð eru ítøkiligar verkætlanir settar í verk, har føroyskir ráðgevar hava verið sendir út í samstarv við fólk hjá Mercy Corps at útinna menningararbeiði.*

*Ferðin til New York og Washington var í samband við verkætlanina saman við Heimsbankanum um Palau, har løgmaður undirritaði samstarvsavtalu við Heimsbankan í Washington. Henda verkætlan verður veruleiki í ár, har Jarðfeingi skal veita ráðgeving til stjórnina á Palau um, hvussu mann skipar eina oljuumsiting.*

*Ferðin til Malavi (Johannesburg var bert millumlending á veg til og úr Malavi) var kunningarferð at vitja íslendska menningarhjálparstovnin Iceida og síggja teirra virksemi í einum av høvuðssamstarvslondum teirra. Ferðin var av stórum upplýsandi virði um, hvussu menningararbeiði fer fram, og vit fingu nógvan íblástur til, hvussu vit sjálvi skipa okkara arbeiði framyvir."*

Eftir okkara tykki er spurningurin, um hesar ferðaútreiðslur og aðrar rakstrarútreiðslur eru umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini hjá Løgmansskrivstovuni, ið hevur ábyrgdina av at umsita játtanina.

Vit bóðu um viðmerkingar til hesi sjónarmið og vístu í hesum sambandi á, at í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 til høvuðskontu 2.11.1.02. "Løgmansskrivstovan" stendur: "*Fyrisiting av menningarhjálp er í 2006 flutt til undirkontu 20 í sambandi við, at fulltrúi er settur í starv á Løgmansskrivstovuni at taka sær av málum viðvíkjandi neyðhjálp og menningarhjálp, játtað á høvuðskontunum 2.13.3.02. og 2.13.3.04.*"

Í svarskrivi sínum í september 2007 vísir løgmaður á, at "*umsitingin av menningarsamstarvi er eftir fatanini hjá Løgmansskrivstovuni ikki komin í so mikið fasta legu, at vit neyvari kunnu áseta útreiðslurnar, sum standast av ymsu verkætlanunum. Tískil vil Løgmansskrivstovan halda seg til frágreiðingina omanfyri, til arbeiðið við menningarsamstarvi er komið í eina fastari legu; men sjálvsagt við kritiskum eygum, so at útreiðslur, ið ikki eru beinleiðis tengdar at einstøku verkætlanunum ella royndunum, fara av høvuðskontuni hjá Løgmansskrivstovuni."*

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 (s. 27) umrøddu vit m.a. spurningin um umsitingarútreiðslur:

*Er ætlanin, at játtanin til menningarhjálp eisini skal fíggja umsitingina, heilt ella lutvíst, vil Landsgrannskoðanin mæla til í framtíðini at kunna Løgtingið um hesa avgerð.*

*Í svarskrivi sínum í september 2006 skrivar løgmaður m.a.:*

*"Landsgrannskoðanin vísir á, at Løgmansskrivstovan hevur helst bókað ávísar útreiðslur til rakstur í sambandi við menningarhjálp á skeivan hátt. Við støði í viðmerkingum landsgrannskoðarans fer Løgmansskrivstovan at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið til tess at tryggja, at allar útreiðslur verða so rætt bókaðar sum gjørligt.*

*Viðvíkjandi umsitingarligum útreiðslum til menningarhjálp er í síni heild at siga, at í sambandi við, at játtanin til menningarhjálp varð munandi økt, vórðu 300.000 kr. settar av til fulltrúa á lønarkontuni hjá Løgmansskrivstovuni at taka sær av økinum burturav. Harafturat varð mett, at vanligu føstu útreiðslurnar, sum skrivstovuhald, telefon o.fl. eisini skuldu rindast av hesi høvuðskontu, meðan aðrar útreiðslur, ið meira ella minni beinleiðis eru tengdar at einstøku verkætlanunum ella royndunum, skuldu fara av høvuðskontuni til altjóða menningarsamstarv. Tað er væl møguligt, at onkrar av útreiðslunum, ið eru goldnar av kontuni fyri Menningarsamstarv, av røttum heldur áttu at verðið bókaðar á rakstrarkontuna hjá Løgmansskrivstovuni.*

*Í arbeiðinum at menna fyrisitingina av menningarhjálp, bæði innihaldsliga og ikki minst skipanarliga, verður Løgmansskrivstovan eisini at fáa betri greiði á, hvussu útreiðslurnar best verða býttar ímillum høvuðskonturnar, ávikavist Løgmansskrivstovan og Menningarhjálp. Í hesum arbeiði fer Løgmansskrivstovan eisini at leggja upp fyri viðmerkingum landsgrannskoðarans".*

# 4 FISKIVINNA

## 4.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Granskingarætlanir (rakstrarjáttan) | 3.450 | 3.898 | *448* |
| Tilbúgvingarsamskipan (rakstrarjáttan) | 14.284 | 14.830 | *546* |
| Upplýsing um grind (rakstrarjáttan) | 325 | 445 | *120* |
| Limagjald í altjóða felagsskapum | 1.200 | 1.322 | *122* |

### *4.1.1 Granskingarætlanir (rakstrarjáttan)* 5.11.1.34.

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 3.450 t.kr. Meirnýtslan er 448 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru 420 t.kr., sum skuldu verið bókaðar á høvuðskontu 5.34.3.07. "Fiskivinnuroynddir", bókaðar skeivt. Fiskimalaráðið hevur broytt mannagongdirnar soleiðis, at allar bókingar í framtíðini væntandi verða rættar.

### *4.1.2 Tilbúgvingarsamskipan (rakstrarjáttan)* 5.31.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 14.284 t.kr. Meirnýtslan er 546 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 2.702 | 2.133 | *-569* |
| 21. Brunaumsjón Landsins | 1.485 | 1.605 | *120* |
| 22. Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio) | 4.378 | 4.904 | *526* |
| 23. Sjóbjargingarstøðin (MRCC) | 4.719 | 5.188 | *469* |
| 24. Stuðul til bjargingarfeløg | 1.000 | 1.000 | *0* |
| **Tilsamans** | **14.284** | **14.830** | ***546*** |

Sambært landsstýrismanninum var ikki nóg nógv lagt upp fyri kostnaðinum at seta digitalu sendustøðina og Navtex-skipanina upp.

Partur av útreiðslunum, bókaðar á undirkontu 22 og 23, áttu at verið bókaðar á høvuðskontu 5.31.10.04. "Tilbúgvingarætlan (løgujáttan)", ið hevur eina minninýtslu 211 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at ein kreditnota, 176 t.kr., av misgáum er bókað sum útreiðsla.

Harumframt er ein rokning til Almannastovuna, 158 t.kr., endurgjald til lønarútreiðslur á Brunaumsjón Landsins fyri 2006, ikki bókað í 2006.

Sambært landsstýrismanninum hevur Tilbúgvingarstovnurin sostatt í veruleikanum onga meirnýtslu í 2006, um alt varð bókað rætt.

### *4.1.3 Upplýsing um grind (rakstrarjáttan)* 5.34.1.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 325 t.kr. Meirnýtslan er 120 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er nýtslan vaksin í sambandi við, at Geneviève Desportes nú umboðar Føroyar, sum formaður í vísindanevndini hjá NAMMCO, og hon luttekur eisini sum føroyskt umboð í fleiri arbeiðsbólkum. Somuleiðis er Desportes, vegna Føroyar, formaður í TNASS, sum í 2007 fyrireikar og fremur hvalateljingar í Norðuratlantshavi.

### *4.1.4 Limagjald í altjóða felagsskapum* 5.34.1.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.200 t.kr. Meirnýtslan er 122 t.kr.

Talan er um limgjald Føroya í altjóða felagsskapunum:

- ICES - International Council for the Exploration of the Sea
- NEAFC - North East Atlantic Fisheries Commission
- NAFO - Northwest Atlantic Fisheries Organization
- NAMMCO - North Atlantic Marine Mammal Commission
- NASCO - North Atlantic Salmon Conservation Organization

Sambært landsstýrismanninum eru limagjøldini hækkað.

## 4.2 Minninýtsla

### *4.2.1 Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan)* 5.11.1.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 16.340 t.kr. Minninýtslan er 2.081 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 13.264 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 4. august 2006 varð játtanin hækkað 3.076 t.kr., tí Føroya Rættur 4. juli 2006 hevði dømt Fiskimálaráðið at rinda Sp/f Nakki endurgjald, 3.076 t.kr., fyri at hava tikið fiskiloyvi aftur.

### *4.2.2 Viðlíkahald (rakstrarjáttan)* 5.11.1.15.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 600 t.kr. Minninýtslan er 31 t.kr.

Sambært landsroknskapinum er m.a. talan um hesar útreiðslur:

| | |
|---|---|
| • vindeygavask | kr. 20.800 |
| • ruskkoyring | kr. 9.464 |
| • skilavegg | kr. 85.781 |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðaranar í oktober 2006 umrøddu vit m.a. viðlíkahaldsútreiðslur:

*"Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til viðlíkahald, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til viðlíkahald.*

*Útreiðslurnar at flyta innbúgv o.a. í onnur høli, vindeygavask, keyp av innbúgvi o.t. eru vørur, tænastur og útbúnaður, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.*

*Sambært landsstýrismanninum vóru útreiðslurnar avleiddar av, at flutt varð í nýggj hølir, og neyðugt var at tillaga bygningin til endamálið.*

*Landsgrannskoðanin ivast í, um Løgtingið hevur ætlað, at ein høvuðskonta, markað til viðlíkahald, skal verða brúkt til umrøddu útreiðslur. Eisini á øðrum málsøkjum eru nógv ivamál, hvørt ein útreiðsla er viðlíkahald, og nær talan er um útreiðslur, ið skulu verða bókaðar á stovnin sjálvan ella sum felags viðlíkahald. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Fíggjarmálaráðið tryggjar, at sama mannagongd verður nýtt á øllum málsøkjum, tá ræður um tílíkar játtanir til viðlíkahald."*

Sambært landsstýrismanninum verður vindeygavask og ruskkoyring í framtíðini ikki bókað undir viðlíkahald. Landsstýrismaðurin heldur, at ein "fastur skilaveggur" kemur undir endamálið fyri hesari kontu "*… at røkja og tillaga bygningarnar, sum Fiskimálaráðið nýtir*."

### 4.2.3 *Søla av bygningi hjá Fiskimálaráðnum (løgujáttan)* 5.11.1.45.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2.000 t.kr. Meirinntøkan er 1.254 t.kr.

Talan er um sølu av bygningi í Jónas Broncksgøtu, har sum Skipaeftirlitið helt til. Sambært landsstýrismanninum varð bygningurin boðin alment til sølu.

### 4.2.4 *Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan)* 5.34.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Minninýtslan er 119 t.kr.

### 4.2.5 *Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan)* 5.34.1.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.752 t.kr. Minninýtslan er 129 t.kr.

### 4.2.6 *Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan)* 5.34.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 39.715 t.kr. Minninýtslan er 3.176 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 39.615 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 100 t.kr. vísandi til, at *"stovnar, sum á fíggjarlógini fyri 2006 fingu lønarafturbering v.m., mangla at fáa lønarafturbering v.m. í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar í 2006, í alt 100 t.kr."*

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 37.720 | 34.971 | *-2.749* |
| 21. Veðurtænasta | 430 | 445 | *15* |
| 24. Eygleiðaraskipan | 1.565 | 1.123 | *-442* |
| Tilsamans | 39.715 | 36.539 | *-3.176* |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at avgjøld fyri avreiðingar uttanlands 3.398 t.kr. eru bókað á játtanini til Fiskiveiðieftirlitið.

### 4.2.7 *Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan)* 5.34.3.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5.000 t.kr. Minninýtslan er 341 t.kr.

### 4.2.8 *Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan)* 5.34.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 25.700 t.kr. Minninýtslan er 5.844 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 29.000 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin lækkað 3.300 t.kr.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2001-2006:

t.kr.

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | Játtan 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Minstaløn | 1.200 | 2.993 | 1.205 | 5.471 | 3.627 | 2.703 | |
| Dagstudningur | 8.353 | 9.760 | 11.377 | 17.908 | 12.584 | 8.476 | |
| Minstivinningur | 10.277 | 8.200 | 11.027 | 11.264 | 8.522 | 6.785 | |
| Frítíðarløn | 1.146 | 1.528 | 1.510 | 2.805 | 1.936 | 1.345 | |
| Almenn starvsfólkagjøld | 380 | 386 | 298 | 528 | 496 | 539 | |
| **Tilsamans** | **21.356** | **22.867** | **25.417** | **37.976** | **27.165** | **19.848** | **25.000** |

Spurdur, boðaði landsstýrismaðurin í juni 2007 frá, at Fiskimálaráðið hevur ikki sundurgreinað játtanartøl fyri 2007. Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um útreiðslurnar á hesari kontu, ið eru tengdar at, hvussu inntøkurnar eru í fiskivinnuni.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at frá 2008 fer Fiskimála-ráðið at gera eina roynd at útgreina fíggjarætlanina neyvari og eftirmeta útreiðslurnar so við og við.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógarupskotið 2008 eru ikki útgreinað ætlanartøl.

### *4.2.9 Sjúkratrygd (lógarbundin játtan)* 5.34.4.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 8.000 t.kr. Minninýtslan er 1.222 t.kr.

### *4.2.10 Gjald til rækjuflotan (lógarbundin játtan)* 5.34.4.14.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5.000 t.kr. Minninýtslan er 104 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 3.500 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 1.500 t.kr. vísandi til, at tá útreiðslurnar fyri 2006 vórðu mettar, var roknað við færri skipum til rækjufiskiskap.

Sambært Búskaparskipan Landsins hava hesi reiðaravirki í 2006 fingið stuðul:

| Reiðaravirki | Skip | t.kr. |
|---|---|---|
| P/F Havborg | Havborg | 2.000 |
| P/F Líðin | Artic Viking | 1.864 |
| P/F Fríðborg | Fríðborg | 1.032 |
| **Tilsamans** | | **4.896** |

Spurdur, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um enda-málið við studninginum er rokkið, svaraði landsstýrismaðurin í september 2006:

> *"Enn er ov tíðliga at gera endaliga niðurstøðu, um endamálið við gjaldinum er rokkið. Lógin fer úr gildi 31. desember 2006, og eftir tað fara eftirmetingar av tíðini, lógin hevur verið í gildi, at verða gjørdar. Tað kann tó leggjast afturat, at trý rækjuskip fara at vera í vinnu í 2006. Vónandi fer fiskiskapur teirra at vera so mikið góður, at skipini kunnu vera við til at verja okkara rækjurættindi á fjarleiðum. Hugsað verður serliga um okkara rættindi á 3L. Tað var eitt av høvuðsendamálunum við lógini".*

Í apríl 2007 spurdu vit, um landsstýrismaðurin nú hevur eftirmett, um endamálið við studninginum er rokkið.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at tey trý skipini, sum fingu stuðul í 2006, eru enn í vinnu, og Føroyar hava enn rættindi á m.a. 3L. Tí verður hildið, at endamálið við studninginum er rokkið.

Í 2005 vóru 6 skip í vinnu. Í 2006 var helvtin eftir. Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivsasamt, hvønn týdning stuðulin hevur havt.

### *4.2.11 Fiskivinnumenning á landi* 5.34.4.16.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Minninýtslan er 149 t.kr.

Játtanin verður nýtt sambært løgtingslóg nr. 84 frá 28. mai 1996 "um stuðul til menning av fiskivinnu á landi". Stuðul kann verða veittur fiskavirkjum til at:

- virka vørur úr innfluttum fiski
- vørumenning o.a.
- stuðul til menning av innaneftirliti

Eisini verður játtanin nýtt til at gjalda fyri heilsuprógv hjá starvsfólkum á fiskavirkjum og verksmiðjuskipum.

t.kr.

| 5.34.4.16. Fiskivinnumenning á landi | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 14. Keyp av vørum og tænastum (heilsuprógv) | - | 76 | *76* |
| 53. Stuðul til vinnu | 1.000 | 775 | *-225* |

Sambært landsstýrimanninum er orsøkin til minninýtsluna, at ikki útgoldin, men avsettur studningur í 2005, var inntøkuførdur í 2006.

### *4.2.12 Flutningstuðul (lógarbundin játtan)* 5.34.4.22.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.400 t.kr. Minninýtslan er 317 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 2.000 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 1.400 t.kr. vísandi til, at virksemið í fiskivinnuni vísti seg at vera størri, enn væntað varð, og tað hevði við sær hægri flutningskostnað.

### *4.2.13 Telefonstuðul til langfarafiskimenn (lógarbundin játtan)* 5.34.4.37.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.400 t.kr. Minninýtslan er 266 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 2.000 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 1.600 t.kr.

Ll. nr. 96/1997 "um stuðul til telefonútreiðslur hjá langfarasjómonnum" varð við Ll. nr. 144/2005 sett úr gildi 31. desember 2005. Sambært hesari lóg verða umsóknir, sum komu inn eftir 31. mars 2006, ikki viðgjørdar.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð upprunaliga hildið, at ein játtan upp á 2 mió. kr. var rúmlig. Av ávísum orsøkum vísti tað seg, at metingin kom ikki at halda.

### 4.2.14 *Útlán* 5.34.5.01.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 7.000 t.kr. og ein útreiðslujáttan 6.500 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 27.813 t.kr. og útreiðslurnar 56.868 t.kr. Sostatt er talan um sera stór frávik.

t.kr.

| 5.34.5.01. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 01. Útlán, inntøkur | -7.000 | -27.813 | *-20.813* |
| 01. Útlán, útreiðslur | 6.500 | 56.868 | *50.368* |

Sambært landsstýrismanninum vil Fiskimálaráðið í 2008 miða eftir, at betri samsvar verður millum játtan og nýtslu.

### 4.2.15 *Effektivar veðhaldsútreiðslur* 5.34.5.07.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 4.500 t.kr.

Vísandi til roknskapin eru inntøkurnar 3.887 t.kr. og útreiðslurnar 3.781 t.kr. Sostatt er talan um stór frávik.

t.kr.

| 5.34.5.07. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 07. Inntøkur | -4.500 | -3.887 | *-613* |
| 07. Útreiðslur | - | 3.781 | *3.781* |

Sambært landsstýrismanninum vil Fiskimálaráðið í 2008 miða eftir, at betri samsvar verður millum játtan og nýtslu.

### 4.2.16 *Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (rakstrarjáttan)* 5.35.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 242 t.kr. netto. Minninýtslan er 326 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 500 t.kr. og ein útreiðslujáttan 742 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 756 t.kr. og útreiðslurnar 672 t.kr.

# 5 VINNUMÁL

## 5.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Søla av landsins ognum (løgujáttan) | -10.000 | - | *10.000* |
| Rúsdrekkasøla Landsins (landsfyritøka) | -11.848 | -11.483 | *365* |
| Lánsafturgjald | 2.500 | 1.668 | *832* |
| Nýggir landsvegir (løgujáttan) | 140.500 | 141.477 | *977* |

### *5.1.1 Søla av landsins ognum (løgujáttan)* 6.11.1.47.

Á fíggjarlógini 2006 er ein inntøkujáttan 10 mió.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaða sølurprísin fyri oljutangarnar, sum landið eigur í Sørvági og í Søldarfirði, og sum á fíggjarlógini 2006 og 2007 var mettur til 10 mió.kr.

Í skrivi 16. november 2006 til Fíggjarnevndina í sambandi við fíggjarlógina 2007 hevur Vinnumálaráðið greitt neyvari frá ætlaðu søluni av oljutangunum:

> *"Oljutangarnir verða ikki seldir í ár (2006), og verður játtanin tí tikin við í broytingaruppskotið til fíggjarlógaruppskotið fyri 2007.*
>
> *Statoil hevur leigað oljutangarnar frá landinum síðan seinast í 40–árunum, og hevur felagið øll hesi ár hildið tangarnar viðlíka og gjørt nýggjar installatiónir. Statoil heldur, at teirra installatiónir hava eitt bókað virði uppá 4,5 mió.kr., og at felagið eigur at fáa eitt endurgjald, sum svarar til hesa upphædd.*
>
> *Leigusáttmálin er de facto galdandi enn. Sambært sáttmálanum skulu partarnir, tvs. Landsverk (Landsstýrið) og P/f Statoil samráðast um málið, áðrenn landsstýrið tekur endaliga avgerð um, hvat skal henda.*
>
> *Tangarnir eru ein týðandi partur av goymsluskipanini hjá Statoil. Verður tað soleiðis, at Statoil ikki keypir oljutangaranar, so er neyðugt av hava atlit til, at tað tekur tíð hjá felagnum at reetablera seg aðrastaðni, fáa nýggjar oljutangar til vega o.t.*
>
> *Samanumtikið verða ikki stundir til at avgreiða omanfyri nevndu mál í ár (2006), og verður upphæddin tí endurjáttað."*

Málið varð viðgjørt á landsstýrisfundi 11. september 2007, og landsstýrismaðurin hevur fingið undirtøku fyri, at oljutangar landsins í Sørvági og Søldarfirði við tilhoyrandi lendi verða bodnir út alment til sølu.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er ein inntøkujáttan 10 mió.kr. Sambært viðmerkingunum varð fyrireikingararbeiðið ikki liðugt at fremja søluna í 2007.

Virðismeting

Landsgrannskoðanini heldur tað vera skilagott at gera eina dagførda virðismeting eftir viðurkendum meginreglum. Ein virðismeting ger seljaran føran fyri at meta um, hvørt tilboðini frá keyparum eru nøktandi, og virðismetingin kann vera ein stuðul í seinni samráðingum við keyparar.

Víkja tilboðini nógv frá virðismetingini, kann spurningur verða settur við, um sølan er nóg væl marknaðarførd, ella um nóg nógv kapping er um søluna. Tað er eisini góður siður, at seljari setir sær ein minstaprís.

Viðhvørt kann seljari seta uppá, at t.d. ein bygningur er trupul at virðismeta, tí hann er so serstakur, einki er at bera saman við o.s.fr., men havast skal í huga, at keypararnir hava ikki fleiri og betri upplýsingar, enn seljarin hevur. Hevur seljari ikki

megnað at útvega eina virðismeting, kann tað vera tekin um, at hann ætlar at selja fyri ein ónøktandi prís, og at hann ikki vil ábyrgjast fyri tað; sjálvandi má eitt mark vera fyri, hvussu kostnaðarmiklar tílíkar virðismetingarnar eru.

*Í oktober 2007 spurdu vit*

- *um Vinnumálaráðið hevur útvegað sær eina virðismeting av oljutangunum,*
- *hvørjar fortreytir metingin byggir á,*
- *um metingin byggir á viðurkendar meginreglur um at virðismeta tílíkar ognir.*

Landsstýrismaðurin svaraði, at Vinnumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini í, at tað er skilagott at gera eina dagførda virðismeting av oljutangunum, sum ein kann halda seg til í seinri samráðingum við møguligar keyparar. Landsstýrismaðurin vísir á, at Byggi- og bygningsumsitingin hjá Landsverki kann standa fyri virðismetingini, ella lata hana gera, um tørvur er á tí.

### *5.1.2 Rúsdrekkasøla Landsins (landsfyritøka)* 6.37.3.01.

Á fíggjarlógini er avlopið hjá Rúsdrekkasølu Landsins sett til 11,8 mió.kr. Minni-inntøkan er 365 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð skotið upp at hækka játtanina 1 mió.kr. til eykaútreiðslur til innbúgv, útbúnað, trygdarskipan og innrættan av hølum í Eysturoynni. Fíggjarnevndin helt, at *"Rúsdrekkasølan eigur at klára seg innan fyri sín karm, tí tekur nevndin ikki undir við eini eykajáttan."* Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt.

### *5.1.3 Lánsafturgjald* 6.37.6.01.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 832 t.kr.

Vinnumálaráðið hevur áður greitt frá, at Gjaldstovan umsitur játtanina, og at talan er um lán frá grunnum, sum eru niðurlagdir.

### *5.1.4 Nýggir landsvegir (løgujáttan)* 6.38.1.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 140,5 mió.kr. Meirnýtslan er 977 t.kr.

Frágreiðing um meirnýtsluna

Í juni 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"generelt kann sigast, at tað er trupult ikki at hava eitt ávíst frávik á játtanini til íløgur í landsvegir. Talan er um eina stóra játtan, sum er lutað sundur í 22 verkætlanir (vegagerðir), og verður arbeitt við næstan øllum teimum størru verkætlanunum tvørturum fíggjarár."*

Frágreiðing um vegagerðina í Leivík

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 129,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini februar 2006 varð játtanin hækkað 1 mió.kr. til kanningar í sambandi við vegagerðina í Leirvík.

Á eykajáttanarlógini apríl 2006-2 varð játtanin hækkað 10 mió.kr. til vegagerðina í Leirvík. Í áliti sínum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin:

> *"Eykajáttanin er ein fylgja av Lm. 111/2005 "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð", har tó onki álit er lagt fram enn. Játtanin eigur at verða nýtt í samsvari við ta avgerð, sum Løgtingið tekur í tí málinum.*

*Hóast hetta heldur nevndin, at partur av játtanini kann nýtast til at stuðla tiltøkum, sum eru neyðug fyri at tryggja, at ferðslan gjøgnum bygdina kann koyra trygt og smidliga, til nýggi vegurin kann takast í nýtslu."*

Í apríl 2007 spurdu vit landsstýrismannin, hvussu nógvur peningur er nýttur í 2006 til vegagerðina í Leirvík.

Í juni 2007 svaraði landsstýrismaðurin:

*"2,51 mió kr. vórðu nýttar til vegagerð í Leirvík. Meginparturin av hesum peningi fór til at betra um trygdina á verandi vegi, sum verður brúktur til verandi gjøgnumkoyring í Leirvík, og nakað varð nýtt til at prosjektera nýggja vegin.*

*Verkætlanin fyri nýggja vegin varð løgd fyri náttúrufriðingarmyndugleikan til góðkenningar, men varð verkætlanin ikki góðkend endaliga fyrr enn tíðliga í ár (2007). Farið varð tí ikki undir sjálva vegagerðina í 2006."*

Eftir hesum at døma eru bert nýttar 2,5 mió.kr. av teimum 11 mió.kr., ið sambært eykajáttanarlógini februar 2006 og eykajáttanarlógini apríl 2006-2 vórðu "markaðar" til vegagerðina í Leirvík. Hóast tað, er talan um eina meirnýtslu, um 1 mió.kr., á høvuðskontuni. Tað bendir á, at 8,5 mió.kr., ið vórðu játtaðar til vegagerðina í Leirvík, eru nýttar til annað endamál. Í juli 2007 bóðu vit landsstýrismannin um neyvari frágreiðing.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin víst á, at *"eftir játtanarskipanini er landsstýrismaðurin ikki bundin av sundurgreiningini millum fleiri løguarbeiði undir somu høvuðskontu, treytað av, at metti samlaði kostnaðurin fyri einstøku ætlanirnar heldur, og at samlaða játtanin heldur á høvuðskontuni."*

<u>Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanina</u>

Landsgrannskoðani heldur orðingarnar í játtanarskipanini vera ætlaðar til upprunajáttanir á fíggjarlógini. Í hesum føri er talan er eina eykajáttanarlóg, har ein játtan verður hækkað 10 mió.kr. til eitt ávíst løguarbeiði.

Víst kann eisini verða til álitið frá Fíggjarnevndini til eykajáttanarlógina apríl 2006-2:

*"Eykajáttanin er ein fylgja av Lm. 111/2005 "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð", har tó onki álit er lagt fram enn. Játtanin eigur at verða nýtt í samsvari við ta avgerð, sum Løgtingið tekur í tí málinum."*

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini í, at rættast hevði verið, at peningurin, játtaður við eykajáttanarlóg og markaður til vegagerðina í Leirvík, ikki varð nýttur til onnur løguarbeiði í 2006.

Landsgranskoðanin kann leggja afturat, at landsstýrismaðurin í september 2007 bað Løgtingið um at lækka játtanina til vegagerðina í Leirvík 7,2 mió.kr., tí peningurin fór ikki at verða nýttur til ætlaða endmálið. Hetta samanborið við 2006, tá 8,5 mió.kr. til ætlaðu vegagerðina í Lerivík vórðu nýttar til onnur endamál.

## 5.2 <u>Minninýtsla</u>

### *5.2.1 Jarðfeingi (rakstrarjáttan)* 6.32.1.03.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 17.923 t.kr. Minninýtslan er 3.234 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 19.533 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin lækkað 1.610 t.kr. vísandi til, at ein partur av jarðfrøðiligu kanningunum, sum skuldu gerast við atliti at møguligum krøvum um havbotnsrættindi uttan fyri 200 fjórðingamarkið, vórðu útsettar til næsta ár.

Sambært landsstýrismanninum vórðu meginparturin av jarðfrøðiligu kanningunum, sum skuldu gerast, serliga norðan fyri Føroyar, ikki gjørdar. Grundin var, at onki seismikkskip var tøkt til endamálið.

### 5.2.2 *Innsavnan av ull og skinnum* 6.33.2.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 750 t.kr. Minninýtslan er 43 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 450 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 300 t.kr. vísandi til, at játtanin av misgáum ikki varð hækkað 300 t.kr. á fíggjarlógini 2006.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin *"tað vera heldur lítið framtíðarrættað at nýta stuðulin til seyðaskinn sum flutningsstuðul. Landsstýrismaðurin eigur at kanna møguleikarnar fyri at gagnnýta hesa ráværu betur."*

Í apríl 2007 spurdu vit, um landsstýrismaðurin hevur kannað møguleikarnar.

Í juni 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at hann hevur ikki nakra konkreta ætlan fyri, hvussu stuðulin kann verða nýttur á annan hátt. Ætlanin við stuðlinum er at fáa skinnini til høldar, men tað er uppgávan hjá vinnuni at gagnnýta skinnini.

### 5.2.3 *Almenn jørð, søla* 6.33.2.11.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 0 kr. netto. Meirinntøkan er 28 t.kr.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6,3 mió.kr. til útreiðslur og 6,3 mió.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 9,9 mió.kr. og útreiðslurnar 9,9 mió.kr.

t.kr.

| Almenn jørð, søla | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -6.300 | -9.857 | *-3.557* |
| Útreiðslur | 6.300 | 9.885 | *3.585* |
| **Tilsamans** | **0** | **-28** | ***-28*** |

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina, undir Búnaðarstovuni, er greitt frá um heimildirnar. Sambært løgtingslóg nr. 20 frá 17. mai 2004 um landsjørð, er heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, t.d. til grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál. Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 "um Búnaðargrunn" skal ágóðin av søluni flytast Búnaðargrunninum og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Talan er um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan. Tað er sera ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld hvørt árið, og er játtaða upphæddin tí bert ein meting, sum byggir á søluna undanfarin ár.

### 5.2.4 *Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan)* 6.36.1.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6.450 t.kr. Minninýtslan er 1.392 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 1.050 | 707 | *-343* |
| 21. Basan av fiskasjúkum | 5.400 | 4.352 | *-1.049* |
| **Tilsamans** | **6.450** | **5.058** | ***-1.392*** |

Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Sambært landsstýrismanninum er avtala gjørd við tvær djóralæknatænastur, sum veita tænastur fyri tað almenna í sambandi við at basa sjúkur í alivinnuni. Sambært heilsu-skipanini skulu smoltstøðir og alistøðir javnan verða kannaðar.

Sambært landsstýrismanninum vóru ikki allir lokalitetir á sjónum og ikki allar smoltstøðir á landi í brúki í 2006. Orsøkin var sjúkutrupulleikarnar í vinnuni.

Undirkonta 21. Basan av fiskasjúkum

Sambært landsstýrismanninum verður arbeitt við einari royndarverkætlan, sum er ein farsóttalig kanning og økiskoppseting móti ILA í Føroyum. Sambært kunngerð fíggjar landið eftirlit, tøku og kanningar av royndum frá alifiski.

Í 2006 var framleiðslan av alifiski einans 16 túsund tons, meðan grundarlagið fyri játtanini var ein munandi størri framleiðsla. Tað merkti, at talið av m.a. ILA-kanningum minkaði, og tískil eisini útreiðslurnar.

### *5.2.5 Skráseting Føroya (rakstrarjáttan)* 6.37.1.18.

Á fíggjarlógini er ein nettoinntøkujáttan 580 t.kr. Meirinntøkan er 756 t.kr.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 1.920 t.kr. og ein útreiðslujáttan 1.340 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 3.284 t.kr. og útreiðslurnar 1.948 t.kr.

t.kr.

| Skráseting Føroya | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -1.920 | -3.284 | *-1.364* |
| Útreiðslur | 1.340 | 1.948 | *608* |
| **Tilsamans** | **-580** | **-1.334** | ***-756*** |

Sambært landsstýrismanninum vórðu væl fleiri feløg stovnað (skrásett), enn roknað varð við frammanundan.

### *5.2.6 Tryggingareftirlitið (rakstrarjáttan)* 6.37.1.21.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 0 t.kr. netto. Meirinntøkan er 16 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 550 t.kr. til útreiðslur og 550 t.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 625 t.kr. og útreiðslurnar 611 t.kr.

t.kr.

| Tryggingareftirlitið | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -550 | -625 | *-75* |
| Útreiðslur | 550 | 609 | *59* |
| **Tilsamans** | **0** | **16** | ***-16*** |

### *5.2.7 Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan)* 6.37.5.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 9,7 mió.kr. Minninýtslan er 170 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 4,7 mió.kr. til umbygging, útskifting av útbúnaði og dagføring av hølisviðurskiftunum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Hetta fyri at kunna lúka tey minstukrøv, sum sett verða til starvsstovuna í føroyskari lóggávu og í sátt-málum við útheimin, herímillum við ES.

### 5.2.8 *Granskingarlund (løgujáttan)* 6.37.5.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. At kalla eingin peningur er brúktur, og minninýtslan er 1.889 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina var ætlanin at byggja eina granskingarlund, sum skuldi verða pallur fyri almennum og privatum granskingar- og starvsstovuvirksemi innan humana- og veterinera økið o.a. Játtanin var ætlað til byggiskrá og til at prosjektera fyrsta byggistigið í 2006. Sum nevnt, er eingin peningur brúktur í 2006.

Sambært landsstýrismanninum tóku ymiskir formligir trupulleikar seg upp í málinum, sum gjørdu, at málið dró út. Komið varð eftir, at økið á Debesartrøð, sum ætlanin var at byggja á, kanska var friðað (tað er staðfest í 2007), og at lendið er heft við ymiskum treytum (servituttum). Arbeitt hevur tí verið við øðrum loysnum.

Á fíggjarlógini 2007 er 1 mió.kr. játtað til at prosjektera. Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er játtanin 22,8 mió.kr. Sambært viðmerkingunum verður ætlandi farið undir bygginina í 2008. Ætlanin er at nýta helvtina av stovnsfænum hjá Vinnuframagrunninum til at fíggja bygginina av Granskingarlundini í 2008. Tað krevur lógarheimild, og verður lógaruppskot tí lagt fyri Løgtingið um málið.

### 5.2.9 *Landsverk (rakstrarjáttan)* 6.38.1.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 67,4 mió.kr. Minninýtslan er 472 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Landsverksskrivstovan | 8.300 | 8.409 | 109 |
| 30. Landsvegahald | 52.000 | 51.181 | -819 |
| 35. Havnir | 5.630 | 5.769 | 139 |
| 38. Flogferðsla | 1.500 | 1.762 | 262 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi, hald av landsvegum | - | -163 | -163 |
| **Tilsamans** | **67.430** | **66.958** | **472** |

### 5.2.10 *Stuðul til infrakervið á útoyggjum* 6.38.1.18.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.000 t.kr. Minninýtslan er 1.252 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minninýtsluna:

- Einki fólk fekst til arbeiðið á bakkaverjuna í Skúvoy.
- Føroya Tele vildi sjálvt gera og fíggja arbeiðið við at dagføra breiðbandssambandið í Skúvoy, Dímun, Svínoy og Fugloy.
- Eftir at Sørvágs kommuna hevði fingið játtað pening til at tøma bátahylin í Mykinesi og gera ábøtur á lendingina, broytti hon støðu og ætlaði at brúka peningin til heilt onnur endamál. Tað er í stríð við kunngerðina, og Landsverk hevur fleiri ferðir, til fánýtis, heitt á kommununa um at venda aftur til upprunaligu ætlanina.

### 5.2.11 *Flogferðsla (løgujáttan)* 6.38.2.13.

Á fíggjarlógini er eingin peningur játtaðar. Sambært landsroknskapinum er talan um inntøku 121 t.kr., sum stavar frá einari umbóking.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 2.000 t.kr., ið vóru ætlaðar til at byggja nýggjan tyrlupall á Kirkju.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin strikað, vísandi til at verkætlanin varð av ongum í 2006, tí útlit vóru ikki fyri, at spurningurin um søluna av lendinum, har tyrlupallurin skal standa, varð loystur í 2006.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin, *"at tað, at eingin møguleiki er fyri at ognartaka lendi til tyrlupall, er sera óheppið. Nevndin heldur, at landsstýrismaðurin eigur skjótast gjørligt at fáa neyðugu lógarheimildirnar o.a. upp á pláss."*

Í apríl 2007 spurdu vit, hvørji stig landsstýrismaðurin hevur tikið í málinum.

Í juni 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Vinnumálaráðið hevur orðað eitt útkast til lógaruppskot um ognartøku til flogvallarendamál.

28. september 2007 legði landsstýrismaðurin fram uppskot til løgtingslóg "um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál".

### *5.2.12 Barsilsskipan (lógarbundin játtan)* 6.39.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 72,4 mió.kr. Minninýtslan er 2,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var burðartalið í 2006 nakað lægri, enn mett varð.

## 5.3 Aðrar viðmerkingar

### *5.3.1 Byggiumsiting Landsins*

Sambært landsroknskapinum 2006 eru lønir til starvsfólk (byggi- og verkfrøðingar) hjá Landsverki bókaðar á 16 ymiskar høvuðskontur á 7 málsøkjum:

kr.

| Høvuðskonta | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 1.10.1.10. | Nýggjur bygningur til Føroya Løgting (løgujáttan) | 112.066 |
| 2.11.1.21. | Umbygging í Tinganesi (løgujáttan) | 18.130 |
| 6.37.5.05. | Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan) | 24.254 |
| 6.37.5.06. | Granskingarlund (løgujáttan) | 4.840 |
| 6.38.1.14. | Havnir (løgujáttan) | 1.760 |
| 6.38.1.18. | Stuðul til infrakervið á útoyggjum (onnur játtan) | 11.834 |
| 7.11.1.14. | Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 621.781 |
| 7.23.3.06. | Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | 79.035 |
| 7.23.3.07. | Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) | 38.902 |
| 7.23.3.08. | Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) | 48.346 |
| 7.23.3.28. | Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 84.948 |
| 7.23.6.14. | Føroya Læraraskúli (løgujáttan) | 22.000 |
| 8.11.1.10. | Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 21.054 |
| 8.20.3.08. | Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 212.187 |
| 8.21.6.02. | Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 51.137 |
| 15.38.2.02. | Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) | 28.471 |
| **Tilsamans** | | **1.380.745** |

Landsverk hevur í 2006 "sent" rokningar fyri byggiumsiting, um 1,4 mió.kr., til viðlíkahalds- og løgukontur, sum Landverk sjálvt hevur ræðisrættin á.

Í skrivi 21. februar 2007 til løgmann, í sambandi við fíggjarnevndarskjali viðvíkjandi Strandfaraskipum Landsins, sigur Fíggjarnevndin, at nevndin hevur fingið enn eitt dømi um, at skipanin við Byggiumsiting Landsins ikki virkar nøktandi:

> *“Nevndin heldur tað ikki vera rætt, at Landsverk fær inntøku av byggiverkætlanum, sum Landsverk umsitur. Tað, sum Byggiumsiting Landsins kostar, eigur at játtast á fíggjarlógini serstakt og ikki gjøgnum ta einstøku byggiverkætlanina.*
>
> *Fíggjarnevndin skal vísa á, at fíggjarlógin er ein heimildarlóg, og tí eigur játtanin at fylgja ræðisrættinum. Nevndin heldur, at innanhýsis flytingar gera tað ógjørligt hjá Løgtinginum at vita, hvørjum tað gevur heimild til at nýta pening, og í veruleikanum ganga tær ímóti játtanarreglunum um, at ikki skal flytast ímillum høvuðskontur.”*

Í juli 2007 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at tað tekur fult undir við sjónarmiðum Fíggjarnevndarinnar, at kostnaðurin av Byggiumsitingini eigur at verða játtaður serskilt og eigur ikki at verða spjaddur út á byggiverkætlanirnar. Fíggjarmálaráðið fer ætlandi at taka hetta mál upp við Vinnumálaráðið í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2008.

Landsgrannskoðanin skal vísa, at á fíggjarlógini 2007 er á høvuðskontu 6.38.1.02. “Landsverk” stovnað ein nýggj undirkonta 22. “Byggi- og bygningsumsiting landsins” við einari lønarútreiðslu 1,9 mió.kr.

Sama upphædd er á fíggjarlóguppskotinum 2008.

Sambært viðmerkingunum til undirkontuna er “*endamálið við kontuni at umsita landsins bygningar, bæði byggi- og viðlíkahaldsuppgávur. Við at savna umsitingina hjá Landsverk, verða allar uppgávur, sum hava við byggimál landsins at gera, loystar á einum staði. Við at savna vitanina til málsøkið hjá Landsverki, verður umsitingin munadyggari, betri skipað við langtíðarætlanum og møguleikum fyri at optimera nýtsluna.”*.

Tað kundi bent á, at frá 2007 verða lønarútreiðslur fyri byggiumsiting til viðlíkahalds- og løgukontur, sum Landverk sjálvt hevur ræðisrættin á, bókaðar á hesari undirkontu.

# 6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING

## 6.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) | 14.793 | 15.311 | *518* |
| Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan) | 1.316 | 1.558 | *242* |
| Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) | 32.800 | 33.312 | *512* |
| Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) | 887 | 1.263 | *376* |
| Bókasøvn (rakstrarjáttan) | 12.344 | 12.874 | *530* |
| Føroya Náttúrugripasavn (rakstrarjáttan) | 3.555 | 3.703 | 148 |
| Listasøvn (rakstrarjáttan) | 1.957 | 2.032 | *76* |

### *6.1.1 Mentamálaráðið (rakstrarjáttan)* 7.11.1.09.

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 14,8 mió.kr. Meirnýtslan er 518 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 12.808 | 13.545 | *737* |
| 21. Yrkisútbúgvingarskrivstovan | 1.985 | 1.766 | *-219* |
| **Tilsamans** | **14.793** | **15.311** | ***518*** |

Sambært landsstýrismanninum hevur sera stórt virksemi verið í ráðnum í 2006, serliga í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni. Harumframt yvirtók landsstýrismaðurin við ársbyrjan í 2006 málsøkið "norðurlendskt samstarv", og eisini er nógv orka farin til ES-samstarvið.

### *6.1.2 Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan)* 7.23.1.34.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.316 t.kr. Meirnýtslan er 242 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna:

- *at* fleiri lærarar, sum vóru námsstuðlar í ástøðiliga partinum av námsfrøðiligu útbúgvingini á heysti 2005, ikki sendu uppgerð inn fyrr enn í mars 2006, hóast teir høvdu fingið áminning. Samlaða upphæddin var um kr. 90.000.
- *at* leiðsluskeiðini gjørdist um kr. 33.000 dýrari enn ætlað.
- *at* gjørt var av at senda 7 lærarar í verkligan part. Tað var ov nógv, tí miðalútreiðslan fyri hvønn lærara var hægri, enn roknað varð við. Roknað varð við einari miðalútreiðslu upp á 110.000 kr, men útreiðslan var heldur á leið 125.000 kr.

### *6.1.3 Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan)* 7.23.2.07.

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 32,8 mió.kr. Meirnýtslan er 512 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum stendst meirnýtslan m.a. av reguleringum og lønarhækkingum, sum eru bókaðar í desember 2006. Kontan varð ikki, sum hon átti, hækkað við eykajáttan í sambandi við lønarhækkingina.

### 6.1.4 *Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan)* 7.23.6.23.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 887 t.kr. netto. Meirnýtslan er 376 t.kr. netto.
Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Økismenningargransking | 887 | 1.581 | *694* |
| 21. Økismenningargransking - inntøkufíggjað virksemi | - | -318 | *-318* |
| **Tilsamans** | **887** | **1.263** | ***376*** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna m.a.:

- trupulleikar av at tillaga virksemið til játtanina, tí hon varð munandi lækkað í 2006,
- seinking av útlendsku verkætlanunum hevði við sær færri inntøkur enn væntað,
- at telduskipanin í Klaksvík steðgaði í oktober 2006. Neyðugt var at keypa nýggja útgerð.

### 6.1.5 *Bókasøvn (rakstrarjáttan)* 7.24.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12.344 t.kr. Meirnýtslan er 530 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 12.216 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 128 t.kr. til ljóðbókaframleiðslu.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Føroya Landsbókasøvn | 5.674 | 6.697 | *1.023* |
| 21. Fólkabókasøvn | 6.142 | 5.649 | *-493* |
| 22. Stuðul til ljóðbókaframleiðslu | 528 | 528 | - |
| **Tilsamans** | **12.344** | **12.874** | ***530*** |

Sambært landsstýrismanninum skifti Føroya Landsbókasavn í 2006 til nýggja bókasavnstelduskipan, ALEPH. Skipanin fevnir um Landsbókasavnið, øll fólka- og skúlabókasøvnini uttan fyri Havnina, nøkur stovnsbókasøvn, bókasøvnini á flestu miðnámsskúlum landsins, umframt á Fróðskaparsetrinum, Læraraskúlanum og Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum - tilsamans 35 ymisk bókasøvn.

### 6.1.6 *Føroya Náttúrugripasavn (rakstrarjáttan)* 7.24.3.13.

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 3.555 t.kr. Meirnýtslan er 148 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var játtanin til lønarútreiðslur ikki økt samsvarandi lønarhækkingunum, og í 2006 vóru færri inntøkugevandi verkætlanir enn væntað.

### 6.1.7 *Listasøvn (rakstrarjáttan)* 7.24.3.22.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.957 t.kr. Meirnýtslan er 76 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Listasavn Føroya | 1.926 | 1.982 | *56* |
| 30. Onnur listasøvn | 31 | 51 | *20* |
| **Tilsamans** | **1.957** | **2.032** | ***76*** |

Sambært landsstýrismanninum stendst meirnýtslan av:

- høga oljuprísinum í 2006,
- at konservering av listaverkum varð dýrari enn væntað,
- stuðulin til konservering gjørdist minni, enn Listasavnið hevði roknað við.

## 6.2 <u>Minninýtsla</u>

### *6.2.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan)* 7.11.1.14.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6.250 t.kr. Minninýtslan er 159 t.kr.

Sambært landsroknskapinum eru av høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald” í 2006 m.a. nýttar:

1. kr. 24.650 til køk, multiovn, keramikplátu o.t. til Føroya Studentaskúla og HF-skeið í Hoydølum,
2. kr. 160.678 til ”Erco Lighting” til Føroya Listasavn.

Vit hava biðið um neyvari frágreiðing um hesar útreiðslur.

<u>Ad 1</u>

Sambært landsstýrismanninum skuldi nýggjur køkur gerast til næmingaíbúðirnar í “læknahúsinum”.

<u>Ad 2</u>

Sambært landsstýrismanninum vóru ljósviðurskiftini út av lagi vánalig í Listaskálanum. Harafturat var ljósið skaðiligt fyri listaverkini, og tí varð neyðugt at broyta tað.

Útreiðslurnar eru bókaðar undir standardkontu 16, á StRk 1651 “Umvælingar og viðlíkahaldsútreiðslur – bygningar”.

Landsgrannskoðanin hevur fyrr víst á, í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006, at útreiðslur til innbúgv, trygdarskipan o.t. ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

### *6.2.2 Próvtøkur (rakstrarjáttan)* 7.23.1.31.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5.999 t.kr. Minninýtslan er 324 t.kr.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 vístu vit á, at einki starvsfólkayvirlit er í viðmerkingunum til fíggjarlógina á høvuðskontu 7.23.1.31. “Próvtøkur”.

Í juni 2006 og aftur í juni 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at stig fóru at verða tikin til at gera eitt starvsfólkayvirlit til hesa høvuðskontu.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er einki starvsfólkayvirlit, men í viðmerkingunum verður greitt frá, at “*á próvstovuni starvast 4 fólk, harumframt luttaka millum 600 og 800 persónar í próvtøkugerð og við próvdøming*“.

### 6.2.3 *Sernámsdepilin (rakstrarjáttan)* 7.23.2.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 42,4 mió.kr. Minninýtslan er 441 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 41,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 365 t.kr. til lønarhækkingina 1. oktober 2006 og til avloysarar fyri sjúkrameldað starvsfólk.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 300 t.kr. til fleiri tímar til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum.

Sambært landsstýrismanninum varð eykajáttanin samtykt ov seint, tí var ikki møguligt at økja virksemið fyri jólafrítíðina.

### 6.2.4 *Skúlatilboð til ung við breki (rakstrarjáttan)* 7.23.2.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.272 t.kr. Minninýtslan er 281 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð ikki roknað við næmingainngjøldum, ið stóðu á einari bankakontu. Henda salda varð í desember 2006 flutt á peningastovnskontu hjá Gjaldstovuni.

### 6.2.5 *Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan)* 7.23.3.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 18 mió.kr. Minninýtslan er 11,2 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð skotið upp at lækka játtanina 2 mió.kr., tí hildið varð, at øll játtanin ikki fór at verða brúkt í 2006.

Í álitinum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin tað ikki vera rætt at lækka játtanina, tí talan var ikki um sparingar, men bara at útseta ein íløgu. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum tók prosjekteringin longri tíð, enn roknað varð við. Somuleiðis gjørdust samráðingarnar við arbeiðstakaran nakað drúgvar. Arbeiðið kom tí ikki í gongd so skjótt, sum ætlað, og er tað orsøkin til minninýtsluna.

### 6.2.6 *Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan)* 7.23.3.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5 mió.kr. Minninýtslan er 2,8 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð skotið upp at lækka játtanina 500 t.kr., tí hildið varð, at øll játtanin fór ikki at verða brúkt í 2006.

Í álitinum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin tað ikki vera rætt at lækka játtanina, tí talan var ikki um sparingar, men bara um at útseta ein íløgu. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum eru fleiri orsøkir til minninýtsluna. Prosjekteringsarbeiðið varð seinkað av stórum arbeiðstrýsti og ov lítlari arbeiðsorku. Eftirsum liðið var so langt út á árið, tá arbeiðið varð boðið út, bar ikki til at brúka alla játtanina.

### 6.2.7 *Fiskivinnuskúlin (løgujáttan)* 7.23.3.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 8 mió.kr. Minninýtslan er 5,6 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð skotið upp at lækka játtanina 500 t.kr., tí hildið varð, at øll játtanin fór ikki at verða brúkt í 2006.

Í álitinum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin tað ikki vera rætt at lækka játtanina, tí talan var ikki um sparingar, men bara um at útseta ein íløgu. Fíggjar-

nevndin setti fram broytingaruppskot um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Viðvíkjandi stóru minninýtsluni vísir landsstýrismaðurin á, at byggiarbeiðið skuldi byrja á heysti í 2006, men av væntandi áhuga/ov lítlari kapping varð tað av ongum, og nýtslan gjørdist tí tilsvarandi minni.

### *6.2.8 Skúladepil í Marknagili (løgujáttan)* 7.23.3.09.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 4 mió.kr. Eingin peningur er nýttur í 2006.

Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð skotið upp at lækka játtanin 2,5 mió.kr., tí hildið varð, at øll játtanin fór ikki at verða brúkt brúkt í 2006.

Í álitinum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin tað ikki vera rætt at lækka játtanina, tí talan var ikki um sparingar, men bara um at útseta ein íløgu. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt.

### *6.2.9 Studningur til læripláss (lógarbundin játtan)* 7.23.3.14.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 13 mió.kr. Minninýtslan er 2,1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var minni tilgongd av lærlingum í 2005 enn væntað.

### *6.2.10 Gjald fyri lærusáttmálar* 7.23.3.15.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttaðan 791 t.kr. Meirinntøkan er 361 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var nógv størri tilgongd av lærlingum í 2006 enn væntað.

### *6.2.11 Ferðaendurgjald til læripláss (lógarbundin játtan)* 7.23.3.18.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.450 t.kr. Minninýtslan er 477 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var orsøkin til minninýtsluna minna tilgongdin av lærlingum í 2005.

### *6.2.12 Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)* 7.23.3.28.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 7,5 mió.kr. Minninýtslan er 2,9 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 5,5 mió.kr. til átrokandi neyðugar íløgur í sambandi við krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum.

Sambært landsstýrismanninum vóru 2 mió. kr. av samlaðu játtanini settar av til bygningsarbeiði og 5,5, mió. kr. til vegaarbeiði. Ultimo september 2006 varð bygningsdeildin hjá Landsverki kunnað um, at 2,5 mió. kr. fóru at verða til avlops av játtanini til vegaarbeiði, tí arbeiðið varð steðgað av Tórshavnar Býráð. Meira bygningsarbeiði varð sett í verk, men tað bar ikki til at brúka meira enn 3 mió. kr. til hetta arbeiðið.

### *6.2.13 Klaksvíkar Sjómansskúli (løgujáttan)* 7.23.6.03.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1,2 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum stendst minninýtslan av, at starvsfólkið, sum arbeiddi við málinum, doyði, ráðgevin varð raktur av sjúku, og tað var nærum ógjørligt at fáa handverkarar til prosjektið.

### 6.2.14 *Klaksvíkar Sjómansskúli (rakstrarjáttan)* 7.23.6.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.628 t.kr. Minninýtslan er 335 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru bert tveir flokkar á skúlanum seinnu hálvu í 2006. Í fíggjarætlanini var roknað við trimum flokkum í 2006.

### 6.2.15 *Ungdóms- og bygdahús* 7.24.1.25.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 200 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2006.

Sambært landsstýrismanninum var eingin umbøn búgvin at verða goldin út.

### 6.2.16 *Bókasøvn (løgujáttan)* 7.24.3.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 707 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru fleiri verkætlanir ikki komnar so langt áleiðis, at rindast kundi út.

### 6.2.17 *Savnshús (løgujáttan)* 7.24.3.09.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2006.

Sambært landsstýrismanninum er verkætlanin ikki liðug, tí varð eingin peningur nýttur.

### 6.2.18 *Kirkjubømúrurin (løgujáttan)* 7.24.3.23.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 793 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er verkætlanin seinkað.

### 6.2.19 *Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari* 7.24.4.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 350 t.kr. Minninýtslan er 180 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var virksemið hjá deyvafelagnum til teknmálstulking nakað minni enn mett frammanundan.

### 6.2.20 *Føroysk sjómanskirkja* 7.24.5.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 verður stuðul játtaður til føroysku sjómanskirkjuna, so til ber at løna einum sjómanspresti. So leingi málsøkið "fólkakirkjan" ikki er yvirtikið, ger Føroyska Sjómanskirkjan samstarvsavtalu við Donsku Sjómanskirkjuna um setanarviðurskifti og starvsøki hjá sjómanspresti.

Sambært landsstýrismanninum er játtanin av misgáum ikki brúkt í 2006.

### 6.2.21 *Ítróttaanlegg* 7.24.6.12.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.867 t.kr. Minninýtslan er 1.378 t.kr.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit, at í frágreiðing um "Ymsar stuðulsveitingar á mentanarøkinum", sum landsstýrismaðurin legði fram 16. november 2004 til aðalorðaskiftis - Lm. nr. 101-2/2004 – stóð m.a.:

> *Í løtuni eru givnar tilsagnir um stuðul fyri umleið kr. 7 mió, og tá er ætlaða ítróttahøllin í Sandoy íroknað. Hesar tilsagnir eru givnar við fyrivarni fyri, at ávísar nærri ásettar treytir verða loknar. Søkt er harafturat um stuðul fyri aðrar umleið kr. 20 mió.*

Vísandi til hesa frágreiðing spurdi Landsgrannskoðanin, hvørja lógarheimild landsstýrismaðurin hevði at veita tilsagnir um stuðul, m.a. til ítróttahøll á Sandoynni.

Í august 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at talan var um somu mannagongd, ið hevði verið nýtt seinastu nógvu árini, har stuðul varð játtaður, og í tilsøgnini stóð m.a. eitt fyrivarni um, at stuðulin var treytaður av, at játtan var tøk til endamálið.

Landsgrannskoðanin helt ikki, at ein landsstýrismaður kundi geva tílíkar tilsagnir uttan framman undan at hava fingið heimild frá Løgtinginum. Landsgrannskoðanin vísti í hesum sambandi til Ll. nr. 81 frá 8. mai 2003 "um broyting í løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim". Sambært hesari lógarbroyting fekk landsstýrismaðurin heimild at veita tilsagnir, í mesta lagi 57 mió.kr, árini 2003 - 2005. Landsgrannskoðanin heldur hesa lóg vera dømi um, hvussu lóggivið kann vera um tilsagnir tvørtur um fíggjarár.

Sambært landsstýrismanninum arbeiðir Mentamálaráðið við at gera lóg um ítróttaanlegg, og tekur spurningin um at geva tilsøgn um stuðul tvørtur um fíggjarár við í viðgerðina, m.a. við støði í Ll. nr. 81/2003.

Í januar 2007 kunnaði Mentamálaráðið um, at Ráðið í november 2006 hevði sent lógaruppskot til hoyringar hjá Fíggjarmálaráðnum. Í svarskrivi sínum eftirlýsti Fíggjarmálaráðið eina játtanarrammuheimild og setti spurnartekn við fleiri aðrar ásetingar í lógaruppskotinum, m.a. um ognarviðurskifti og uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Mentamálaráðið heldur tí, at rættast er at taka málið upp av nýggjum og gera eitt lógaruppskot, ið leggur upp fyri viðmerkingunum hjá Fíggjarmálaráðnum. Sambært Mentamálaráðnum eigur uppskotið eisini at vera í samsvari við eitt nú "ítróttaálitið frá august 2005", og fer tað at hava við sær, at stuðulin til ítróttaanlegg og ungdóms- og bygdahús verður raðfestur út frá eini ítrótta- og mentanarpolitiskari heildarætlan.

Í juni 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at enn verður arbeitt við lógaruppskotinum, sum væntandi verður lagt fyri Løgtingið heystið 2007.

# 7 INNLENDISMÁL

## 7.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Lánsafturgjald | -179 | -35 | *144* |
| Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan) | 300 | 337 | *37* |
| Strandfaraskip Landsins (landsfyritøka) | 85.508 | 96.065 | *10.557* |

### *7.1.1 Lánsafturgjald* 15.11.2.07.

Á fíggjarlógini 2006 er ein inntøkujáttan 179 t.kr., ætlað til afturgjald av lánum. Minniinntøkan er 144 t.kr.

Hesi lán eru veitt kommununum til at fíggja keyp av lendi til sethúsaøki, at gera sethúsaøki byggibúgvin, at útstykkja, til vegagerð og til at leggja kloakkir.

Sambært landsstýrismanninum hava tvær kommunur goldið skuld sína í 2005. Inntøkujáttanin 2006 – 2009 eigur tí at vera 35 t.kr.

### *7.1.2 Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan)* 15.30.1.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 300 t.kr. Meirnýtslan er 37 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur arbeiðsbyrðan hjá náttúrufriðingarnevndunum verið større í 2006 enn undanfarin ár.

### *7.1.3 Strandfaraskip Landsins (landsfyritøka)* 15.38.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 85,5 mió.kr. Meirnýtslan er 10,6 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 100.508 | 107.374 | *6.866* |
| 39. Óvanligt | -15.000 | -11.309 | *3.691* |
| **Tilsamans** | **85.508** | **96.065** | ***10.557*** |

Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 91,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 8,7 mió.kr.:

- 8.500 t.kr. til endurgjald til Leirvíkar og Klaksvíkar kommunu í sambandi við, at Leirvíksfjarðaleiðin varð niðurløgd,
- 231 t.kr. til lønarafturbering í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar í 2006.

Við fíggjarnevndarskjali 26. apríl 2006 varð játtanin hækkað 600 t.kr., soleiðis at frítt kundi siglast við Strandfaraskipum Landsins ta vikuna, tað var ókeypis at koyra gjøgnum Norðoyatunnilin.

Á eykajáttanarlógini september 2006, sum varð løgd fyri Løgtingið 28. september 2006, varð skotið upp at hækka játtanina 10 mió.kr.:

mió.kr.

| | |
|---|---|
| Meirnýtsla av gassolju á Smyrli | 1,6 |
| Príshækking, gassolja á Smyrli | 1,9 |
| Príshækking, gassolja, hini skipini | 1,4 |
| Gassolja ístaðin fyri tungolju, 2 mánaðir, Smyril | 1,0 |
| Eyka vakt umborð á Smyrli | 1,6 |
| Farmaflutningsvirksemi | 2,5 |
| **Tilsamans** | **10,0** |

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð eisini skotið upp at játta 10,2 mió.kr. til inntøkur í sambandi við afturføring av havnagjøldum, sum Strandfaraskip Landsins setti av í 2003-2005 ímóti krøvum um økt havnagjøld frá Tvøroyrar og Vestmanna kommunum. Strandferðslan vann rættarmál í Landsrættinum, um krav frá Tvøroyrar kommunu, og gjørdi semju við Vestmanna kommunu.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin, at *"Strandferðslan hevur í veruleikanum brúkt av nøkrum avsetingum í likviditetinum, sum teir ikki hava heimild at hava, í staðin fyri at søkja um eykajáttan. Nevndin heldur, at hetta mál má Landsgrannskoðanin kanna, tí verður ikki hildið, at rætt er at legalisera hetta við einari eykajáttan. Uppskotið verður strikað."* Broytingaruppskotið varð samtykt.

Í desember 2006 bóðu vit landsstýrismannin í innlendismálum um eina frágreiðing.

Í januar 2007 svaraði landsstýrimaðurin, at *"Innlendismálaráðið metir ikki, at niðurstøðan hjá Fíggjarnevndini um, at Strandferðslan skal hava nýtt pening, sum vóru avsettir til havnagjøld, í staðin fyri at søkja um eykajáttan, er røtt... Likviditeturin, ið sipað verður til, er afturføringin av áður avsettu havnagjøldunum. Strandferðslan hevði ikki, tá søkt var um eykajáttan, brúkt hendan likvidetet til nakað undirskot, og pengarnir hava alla tíðina verið tøkir – um so var, at Strandferðslan tapti rættarmálini ímóti Tvøroyrar og Vestmanna kommunu."*

Í apríl 2007 spurdu vit Fíggjarmálaráðið, hvørja støðu ráðið hevði, vísandi til viðmerkingarnar frá Fíggjarnevndini og frágreiðingina frá Innlendismálaráðnum.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Fíggjarmálaráðið tekur frágreiðingina hjá Innlendismálaráðnum til eftirtektur. Fíggjarmálaráðið er tó ikki ført fyri at meta um, hvørt Strandferðslan nýtti pening í heimildarloysi, ella í nóg góðari tíð søkti um eykajáttan. Fíggjarmálaráðið vísir á, at í fíggjarárinum hava allir landsstovnar atgongd til størri nýtslu av gjaldføri landskassans, enn sjálv játtanin er, so leingi hildið verður, at játtanin heldur við roknskaparlok.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at tá ið Innlendismálaráðið gjørdi vart við málið, gjørdi Fíggjarmálaráðið greitt, at á eykajáttanarlógini skuldu inntøkurnar frá afturførdu avsetingunum og mettu meirútreiðslurnar setast upp á hvør sína játtan, hetta serstakliga fyri, at bland ikki skuldi koma í hesi bæði heilt ymisku viðurskiftini. Tí undrar tað Fíggjarmálaráðið, at Fíggjarnevndin eisini mælti til at strika inntøkujáttanina til afturførdu avsetingarnar.

Í mars 2007 eru á undirkontu 20.52.3.10.60. "Óvanligar inntøkur" bókaðar 11,7 mió.kr., sum er afturføring av umrøddu avsettu havnagjøldum.

## 7.2 Minninýtsla

### *7.2.1 Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan)* 15.11.1.39.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 10.415 t.kr. Minninýtslan er 427 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 5.665 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 4.750 t.kr., í sambandi við at Tinglýsingarstovan skuldi fara at virka sum sjálvstøðugur stovnur við egnari høvuðskontu á løgtingsfíggjarlógini. Talan var um flyta inntøkurnar hjá Tinglýsingarstovuni á egna høvuðskontu.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Fíggjarlóg 2006 | EYJ-lóg apríl 2006 | Játtan 2006 | Roknskapur 2006 | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 5.165 | 4.750 | 9.915 | 9.971 | 56 |
| 21. Útlendingamál | 500 | -150 | 350 | - | -350 |
| 22. Arbeiðsmarknaðarráð | - | 150 | 150 | 17 | -133 |
| **Tilsamans** | **5.665** | **4.750** | **10.415** | **9.988** | **-427** |

Undirkonta 21. Útlendingamál

Sambært landsstýrismanninum vóru 500 t.kr. játtaðar til útgreiningararbeiðið í sambandi við útlendingamál. Av tí at játtanin til útgreiningararbeiðið var ein eingangs játtan, varð gjørt av at seta hana á undirkontu 21. Útgreiningararbeiðið varð í fíggjarárinum gjørt innanhýsis, og tí er hendan játtanin óbrúkt.

Undirkonta 22. Arbeiðsmarknaðarráð

Sambært landsstýrismanninum kom arbeiðsmarknaðarráðið ikki at virka fyrr enn seint í fíggjarárinum, og av tí sama vóru fáir fundir í fíggjarárinum 2006. Ætlanin er, at ráðið skal verða meira virkið í fíggjarárinum 2007.

### *7.2.2 Ítróttavedding* 15.14.3.07.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 8.500 t.kr. og ein útreiðslujáttan 8.500 t.kr.

Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 9.522 t.kr. og útreiðslurnar 9.522 t.kr.

Sambært avtalu frá 2003 millum Danske Spil A/S og Sp/f Ítróttarvedding fær Føroyar tann partin av yvirskotinum, sum stavar frá tí spæli, sum fer fram í Føroyum. Danske Spil A/S flytur landskassanum peningin.

Eftir løgtingslóg nr. 34 frá 23. apríl 1999 um ítróttarvedding v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 8 frá 30. mars 2004, skal Landsstýrið flyta peningin til Sp/f Ítróttavedding.

Eftir at sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttaendamál (ÍSF),
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR),
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til, at inntøkurnar vóru størri, enn mett varð, at føroyingar hava spælt meira í 2006 enn í 2005.

### 7.2.3 *Strandfaraskip Landsins (løgujáttan)* 15.38.2.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3 mió.kr. til inntøkur og 3 mió.kr. til útreiðslur.

Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 2,2 mió.kr. og útreiðslurnar 1,8 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 13. Goymsluhøll við ferjuleguna á Krambatanga | 3.000 | 1.847 | *-1.153* |
| 14. Søla av Dúgvuni: | | | |
| Inntøkur | -3.000 | -2.456 | *544* |
| Útreiðslur | - | 291 | *291* |
| 15. Søla av Barskor | - | - | - |
| **Tilsamans** | **0** | **-318** | ***-318*** |

Undirkonta 13. Goymsluhøll við ferjuleguna á Krambatanga: Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina, í sambandi við at nýggja samferðsluhavnin á Krambatanga er tikin í nýtslu, er tørvur á goymsluhøli o.ø. til at avgreiða Smyril. Strandferðslan metti, at løgan kom at kosta um 3 mió. kr. Sambært landsroknskapinum eru nýttar 1,8 mó.kr.

Við fíggjarnevndarskjali 21. februar 2007 vórðu játtaðar 1.150 t.kr. á fíggjarlógini 2007, tí arbeiðið varð ikki liðugt í 2006. Sambært Landsverki byrjaði arbeiðið ikki fyrr enn í september 2006, tí friðingarmyndugleikarnir óvæntað steðgaðu arbeiðinum.

Undirkonta 11. Søla av Dúgvuni: Á fíggjarlógini varð mett, at sølan av Dúgvuni fór at geva 3 mió.kr. Sambært landsroknskapinum varð skipið selt fyri 2.456 t.kr. Harafturat vóru útreiðslur til skipsmeklarar 291 t.kr. Sostatt var nettoinntøkan av søluni 2.165 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var eftirspurningurin eftir skipinum ikki so stórur, og neyðugt var at selja skipið sum skjótast, av tí at virðið á skipum, sum ikki eru í dagligari sigling, fellur dag fyri dag.

Undirkonta 13. Søla av Barskor: Á fíggjarlógini 2006 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtað 1 kr. til inntøkur. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldi Barskor seljast til Íslands fyri 1 kr.

Sambært landsstýrismanninum varð Barskor seldur til Ísland fyri 1 kr.

# 8 ALMANNAMÁL

## 8.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Almanna- og Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) | 20.665 | 20.788 | *123* |
| Talgild heilsuskipan (rakstrarjáttan) | 5.000 | 5.153 | *153* |
| Barnavernd (lógarbundin játtan) | 2.300 | 4.143 | *1.843* |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 7.300 | 7.831 | *531* |
| Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) | 49.547 | 50.456 | *909* |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 117.216 | 119.399 | *2.183* |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 210.318 | 213.938 | *3.620* |

### *8.1.1 Almanna- og Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan)* 8.11.1.08.

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 20.665 t.kr. Meirnýtslan er 123 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 16.430 | 16.824 | *394* |
| 22. Ráð og nevndir | 265 | 163 | *-102* |
| 27. KT-økið | 3.100 | 2.985 | *-115* |
| 28. Tilbúgving | 870 | 816 | *-54* |
| **Tilsamans** | **20.665** | **20.788** | ***123*** |

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan frá sakførararaútreiðslum, hækkandi prísi á olju og el, umframt øðrum óvæntaðum útreiðslum við árslok.

### *8.1.2 Talgild heilsuskipan (rakstrarjáttan)* 8.11.1.41.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5.000 t.kr. Meirnýtslan er 153 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna óvæntaðar útreiðslur, og talan er eisini um óneyva tíðaravmarkan.

Landsstýrismaðurin greiðir eisini frá, at verklagslógin fyri talgilda heilsuskipan gevur landsstýrismanninum heimild at nýta 14.000 t.kr. tilsamans, 9.000 t.kr. í 2005 og 5.000 t.kr. í 2006. Í 2005 vórðu nýttar 8.914 t.kr., ein minninýtsla upp á 86 t.kr. Í 2006 vórðu brúktar 5.152 t.kr., ein meirnýtsla upp á 153 t.kr. Samlaða meirnýtslan fyri verkætlanina er sostatt 69 t.kr.

### *8.1.3 Barnavernd (lógarbundin játtan)* 8.21.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.300 t.kr. Meirnýtslan er 1.843 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 02. Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m. | - | 2.516 | *2.516* |
| 04. Barnavernd | 2.300 | 1.627 | *-673* |
| **Tilsamans** | **2.300** | **4.143** | ***1.843*** |

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan í høvuðsheitum frá, at kommunur hava sent inn rokningar fyri roknskaparárið 2005, um 1.600 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fekk Almannastovan eisini álagt at gjalda fyri uppihald á stovni í Danmark eftir avgerð frá ”Den Sociale Ankestyrelse” í Danmark. Henda avgerð varð tikin eftir gomlu barnaforsorgarlógini.

Hesi bæði málini vórðu ikki endaliga avgreidd fyrr enn í november 2006. Sambært landsstýrismanninum varð tí hildið, at ein eykajáttan at hækka eina lógarbundna játtan, umbiðin so seint á árinum, fór at verða avvíst av Fíggjarnevndini. Tí søkti landsstýrismaðurin ikki um eykajáttan.

### *8.1.4 Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)* 8.21.3.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 7.300 t.kr. Meirnýtslan er 531 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 8.300 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin lækkað 1.000 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru umsóknirnar í desember 2006 fleiri enn væntað.

### *8.1.5 Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan)* 8.21.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 49,5 mió.kr. Meirnýtslan er 909 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 51,5 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin lækkað 2 mió.kr. til undirkontu 01. “Løntakarar”.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 01. Løntakarar | 51.000 | 51.994 | *994* |
| 02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk | 1.800 | 1.672 | *-128* |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 600 | 598 | *-2* |
| 09. Arbeiðsgevarans partur, dagpeningur | -3.853 | -3.808 | *45* |
| **Tilsamans** | **49.547** | **50.456** | ***909*** |

Sambært landsstýrismanninum var óvanliga stórur vøkstur í útgjøldunum síðstu 3 mánaðirnar í 2006 í mun til fyrstu 9 mánaðirnar.

### *8.1.6 Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)* 8.21.7.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 117,2 mió.kr. Meirnýtslan er 2.183 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 116,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð skotið upp at hækka játtanina 790 t.kr.

Fíggjarnevndin helt, at *“tað er nakað tíðliga í fíggjarárinum at avgera, at ætlan landsstýrismansins ikki kann halda seg innan fyri verandi játtan”*. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt, men við 3. viðgerð varð broytingaruppskot um at hækka játtanina 790 t.kr. samtykt.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin lækkað 124 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

mió.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-lóg apríl 2006 | EYJ-lóg sep. 2006 | Játtan | Rokn-skapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 11,8 | - | -1,7 | 10,1 | 12,4 | *2,3* |
| 02. Varandi veiting § 13 | 2,2 | - | | 2,2 | 1,8 | *-0,4* |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 3,0 | - | | 3,0 | 2,9 | *-0,1* |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 18,6 | - | 1,6 | 20,2 | 22,0 | *1,8* |
| 05. Endurbúgving § 18 | 23,9 | - | - | 23,9 | 24,6 | *0,7* |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 43,5 | - | - | 43,5 | 43,8 | *0,3* |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 13,0 | | - | 13,0 | 11,5 | *-1,5* |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 0,5 | 0,8 | - | 1,3 | 0,4 | *-0,9* |
| **Tilsamans** | **116,5** | **0,8** | **-0,1** | **117,2** | **119,4** | ***2,2*** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 116,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 790 t.kr. til hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin til "fyribils hjálp § 9" lækkað 1.700 t.kr., og játtanin til "Meirútreiðslur brekað barn § 17" hækkað 1.576 t.kr.

Undirkonta 01. Fyribils hjálp § 9

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 2,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru útreiðslurnar til umskiftishjálp (hjúnaskilnaður og samlívsslit) hækkaðar nógv í 2006 í mun til 2005.

Undirkonta 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stendst meirútreiðslan fyri tað mesta av umleggingini av stuðlunum eftir § 17 til nýggju stuðlaskipanina. Talan er í høvuðsheitum um uppsagnartíð, feriu og úrtíð hjá gomlum stuðlum. Eisini er talið av viðskiftafólki økt í 2006 í mun til 2005.

Undirkonta 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16

Á hesari undirkontu eru útreiðslurnar 0,9 mió.kr. lægri, enn mett varð. Sambært landsstýrismanninum eru 1,2 mió.kr. av misgáum bókaðar á øðrum kontum.

### *8.1.7 Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)* 8.21.8.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 210,3 mió.kr. Meirnýtslan er 3,6 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 201,3 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 9 mió.kr., vísandi til at *"Almannastovan hevur avgreitt tann størsta partin av fyritíðarpensjónsumbønunum, sum komu frá FUR (Færøernes Ulykkesforsikringsråd) í sambandi við, at avgerðarmyndugleikin varð fluttur frá FUR til Almannastovuna - talan er um yvir 100 gamlar umsóknir. Hetta ger, at útreiðslurnar eru hægri í 2006 enn mett, tí talið av fyritíðarpensjónistum er størri enn vanligt, og tí talan er um stór eftirgjøld í teimum flestu málunum í sambandi við tillutan av fyritíðarpensjón."*

Sambært landsstýrismanninum helt metingin ikki, sum varð gjørd í august 2006, tí Almannastovan avgreiddi fleiri mál enn tey, sum vóru við í metingini. Landsstýrismaðurin ger vart við, at í 2006 fekk Almannastovan avgerðarmyndugleikan frá FUR, og tí var óvanliga trupult at meta útreiðslurnar.

## 8.2 Minninýtsla

### *8.2.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan)* 8.11.1.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 8.159 t.kr. Minninýtslan er 1.192 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 7.659 t.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 500 t.kr. til at keypa grýtur til Klaksvíkar Sjúkrahús, vísandi til at í februar mánaði 2006 kom eldur í eina stóra grýtu í køkinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Neyðugt var at tveita grýtuna burtur. Tá ið hinar grýturnar í køkinum vórðu kannaðar sást, at allar vóru í so ringum standi, at tað var neyðugt at skifta tær út beinanvegin.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina ivast Fíggjarnevndin í háttinum, játtanin til viðlíkahald verður nýtt. *"Fíggjarnevndin hevur greitt landsstýrismanninum frá, at endamálið við hesi játtan er ikki ár um ár at býta hana í sama lutfall til stovnarnar undir Almanna- og Heilsumálaráðnum. Ætlanin við hesi kontu var at geva landsstýrismanninum møguleika at seta størri viðlíkahaldsarbeiði í gongd, har kostnaðurin er størri, enn tann einstaki stovnurin megnar at fíggja av síni rakstrarjáttan tað einstaka árið. Nevndin tekur tí ikki undir við hesi umsókn."*

Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskott um at strika eykajáttanina. Broytingaruppskotið varð samtykt, men við 3. viðgerð varð broytingaruppskot um at hækka játtanina 500 t.kr. samtykt.

Um orsøkina til minninýtsluna vísir landsstýrismaðurin á, at av tí nógva virkseminum í føroysku byggivinnuni gekk illa at fáa útbjóðingartilfar liðugt frá ráðgevarasíðuni, og nøkur arbeiði vórðu ikki sett í verk, tí trot var á handverkarum.

### *8.2.2 Børn og ung (rakstrarjáttan)* 8.21.3.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 39.200 t.kr. Minninýtslan er 2.304 t.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 35.257 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 2.467 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-Lóg 2006 | EYJ-lóg sep. 2006 | Játtan 2006 | Roknskapur 2006 | *Frávik 2006* | Játtan 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. Føroya Barnaheim | 7.095 | 258 | 7.353 | 7.222 | *-131* | 8.185 |
| 21. Rókin | 3.178 | 206 | 3.384 | 2.943 | *-441* | 3.445 |
| 22. Slóðin | 2.905 | 790 | 3.695 | 3.241 | *-454* | 4.098 |
| 23. Reiðrið | 2.338 | - | 2.338 | 2.050 | *-288* | 2.376 |
| 24. Serdagstovnur | 2.260 | - | 2.260 | 2.259 | *-1* | 2.302 |
| 25. Stuðlar til børn | 17.481 | 2.689 | 20.170 | 19.181 | *-989* | 19.341 |
| **Tilsamans** | **35.257** | **3.943** | **39.200** | **36.896** | ***-2.304*** | **39.747** |

Sambært landsstýrismanninum vórðu stovnarnir Føroya Barnaheim, Rókin, Slóðin og Stuðlar til børn noyddir at skerja virksemið í árinum, tí fyrilit skuldu takast fyri, at ein møgulig eykajáttan ikki varð veitt. Eykajáttanin varð veitt so seint, at stovnarnir ikki kundu brúka alla játtanina. Hjá "Reiðrinum" var eitt starv ósett í 2006.

Undirkonta 24. Serdagstovnur

**Viðmerkingar í fíggjarlógini 2006**

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 er ein vaksandi tørvur á ansingartilboðum til børn við serligum tørvi. Tí hevur landsstýrsmaðurin gjørt av at seta á stovn

eitt serligt dagstovnatilboð til børn í aldrinum 3 – 7 ár við tilknýtingar- og atferðatrupulleikum. Dagstovnurin var settur á stovn við heimild í § 33, stk. 2, í barnaverdarlógini.

**Viðmerkingar í fíggjarlógini 2007**

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2007 *"er hetta eitt serligt dagstovnatilboð til børn í aldrinum 3 til 9 ár við tilknýtingar- og atferðatrupulleikum. Dagstovnurin er settur á stovn við heimild í barnaverndarlógini. Á stovninum eru pláss fyri 8 børnum."*

**Virksemi á stovninum í 2006 og higartil í 2007**

Í skrivi til Trivnaðarnevndina í oktober 2006, í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina 2007 kunnaði landsstýrismaðurin m.a. um, at:

> *"Starvsfólk hava verið sett á stovninum síðani 1. mai 2006, og hava tey brúkt tíðina til at fyrireika seg at taka ímóti børnunum, sum er málbólkurin hjá stovninum. Starvsfólkini hava eisini virkað innan fyri bústovnin fyri ung "Slóðina", sum manglar starvsfólk, og tí starvsfólkini á serdagsstovninum kunnu ogna sær meira kunnleika til stovnar fyri børn og ung undir Almannastovuni. Í løtuni samstarva starvsfólkini við Stuðlaskipanina fyri børn."*

Í apríl 2007 bað Landsgrannskoðanin landsstýrismannin um frágreiðing um virksemið í 2006 og higartil í 2007 og spurdi, hvussu nógv børn hava verið/eru á stovninum, og hvørjar ætlanir eru við stovninum í framtíðini.

Í svarskrivi sínum í juni 2007 vísir landsstýrismaðurin til frágreiðing, sum Almannastovan í mars 2007 lat landsstýrismanninum, har Almannastovan hevur eftirmett Serdagstovnin:

> *"Síðan stovnurin lat upp, hevur høvuðsbarnaverndarnevndin bert innskrivað eitt 8 ára gamalt barn til umlætting triðju hvørja viku. Síðan hevur eingin fyrispurningur verið um viðgerð av børnum hoyrandi til málbólkin hjá stovninum...*
>
> *Almannastovan er samd við Barnatænasturnar kring landið um, at tað er eitt afturstig at niðurleggja tann einasta viðgerðarstovnin fyri børn og ung í skúlaaldri í Føroyum, men samstundis kunnu vit ikki hava ein stovn standandi tóman og bíða eftir børnum...*
>
> *Av tí at framtíðin hjá stovninum er ógreið, er hetta ein keðilig støða hjá starvsfólkunum at vera í, og er tað okkara vón, at ein endalig loysn fyri stovnin verður funnin skjótt. Samstundis er neyðugt, at loysnin verður virðilig, soleiðis at uppgávurnar hjá stovninum samsvara við førleikarnar hjá starvsfólkunum."*

Í juli 2007 spurdu vit landsstýrismannin, um ein loysn síðani er funnin.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Almannastovan í apríl 2007 gjørdi av at víðka um tænastutilboðið hjá stovninum til eisini at umfata ambulanta ráðgeving og viðgerð til familjur við barni, ið hevur brek ella varandi víðfevnda sjúku. Í september 2007 eru 9 familjur í viðgerð. Tað er ymiskt, hvussu umfatandi viðgerðin hjá hesum familjum er, men virksemið á stovninum er økt munandi, og tað sær út til at kunna verða eitt varandi tilboð.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at enn eru eingi børn, sum stovnurin upprunaliga varð ætlaður til, innskrivað. Sambært landsstýrismanninum er tað ikki nøktandi, og Almannastovan hevur saman við stovninum ætlanir um at hyggja neyvari at, um tilboðið skal verða endurskoðað.

**Viðmerkingar í fíggjarlógaruppskotinum 2008**

Sambært fíggjarlógaruppskotinum 2008 verður skotið upp at játta 2,4 mió.kr. Undirkontan hevur nú skift navn frá "Serdagstovnur" til "Familjuhúsið". Sambært

viðmerkingunum *"hevur Familjuhúsið tvær eindir. Onnur eindin er ein dagviðgerðarstovnur, við heimild í barnaverndarlógini, til børn við álvarsligum tilknýtingar- og atferðartrupulleikum, í aldrinum 0-7 ár. Møguleiki er fyri vikuskiftisumlætting til børn, ið eru innskrivað á dagviðgerðarstovnin. Pláss er fyri 8 børnum. Hin eindin er ein ráðgevingar- og viðgerðarstovnur, við heimild í forsorgarlógini, ið veitir ambulanta ráðgeving og viðgerðir til familjur við barni, ið hevur brek ella varandi víðfevnda sjúku. Pláss er fyri umleið 10 familjum, men virksemið er tengt at, hvussu nógv børn eru innskrivað á serdagstovnin."*

**Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini**

Landsgrannskoðanin vil vísa á, at upprunaliga endamálið við stovninum var eitt serligt dagstovnatilboð til børn í aldrinum 3 til 7 ár við tilknýtingar- og atferðartrupulleikum. Eftir øllum at døma má fyrireikingararbeiðið hava verið út av lagi misvísandi, eftirsum stovnurin hevur staðið tómur og bíða eftir børnum, síðani hann varð stovnaður.

Grundarlagið undir Serdagstovninum var eitt álit, sum ein arbeiðsbólkur lat landsstýrismanninum í juli 2005. Sambært álitinum skuldi trupulleikin hjá børnum í aldrinum 0 til 7 ár, við álvarsligum atferða- og tilknýtingartrupulleikum, kannast. Sambært arbeiðsbólkinum fór trupulleikin at verða best loystur við at skipa ein serdagstovn, har hesi børn skuldu skrivast inn fyri eitt styttri ella longri tíðarskeið. Spurningurin, um stovnurin skuldi verða eitt dagstovnatilboð ella eitt samdøgurstilboð, hevði eisini verið umrøddur í arbeiðsbólkinum. Arbeiðsbólkurin var samdur um, at tørvurin her og nú var størstur á einum dagstovni, heldur enn á einum samdøgursstovni

Endamál og virksemi á stovninum er síðani heilt broytt. Umframt at vísa til barnaverndarlógina, hevur virksemi stovnsins nú eisini heimild í forsorgarlógini. Landsgrannskoðanin ivast í, um nóg haldgott grundarlag er fyri stovninum. Tað tykist, sum Almannastovan er komin upp í rasshaft av stovninum, og tað ræður nú um at finna eitthvørt skilagott til starvsfólkini at gera, m.a. vísandi til framman fyri nevnda brot úr frágreiðingini til landsstýrismannin í mars 2007:

> *"Av tí at framtíðin hjá stovninum er ógreið, er hetta ein keðilig støða hjá starvsfólkunum at vera í, og er tað okkara vón, at ein endalig loysn fyri stovnin verður funnin skjótt. Samstundis er neyðugt, at loysnin verður virðilig, soleiðis at uppgávurnar hjá stovninum samsvara við førleikarnar hjá starvsfólkunum."*

### *8.2.3 Serforsorg (rakstrarjáttan)* 8.21.6.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 124 mió.kr. Minninýtslan er 4 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-Lóg apríl 2006 | Játtan | Rokn-skapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|---|---|
| 20. Serforsorg, vanligt virksemi | 82.548 | 295 | 82.843 | 79.571 | *-3.272* |
| 21. Stovnsuppihald íDanmark | 19.646 | - | 19.646 | 19.812 | *166* |
| 22. Endurgjald av pensjón til føroyingar í DK | 1.287 | - | 1.287 | 610 | *-677* |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 50 | - | 50 | 81 | *31* |
| 24. Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk | 200 | - | 200 | 64 | *-136* |
| 26. Bústaðar- og virknisdeild fyri sinnisveik | 15.881 | 54 | 15.935 | 15.941 | *6* |
| 27. Heim fyri heilaskadd | 3.974 | 16 | 3.990 | 3.885 | *-105* |
| **Tilsamans** | **123.586** | **365** | **123.951** | **119.964** | ***-3.987*** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 123,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 365 t.kr. í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar í 2006.

Undirkonta 20. Serforsorg, vanligt virksemi

Minninýtslan stavar serliga frá, at undirkonta 20. "Serforsorg, vanligt virksemi" hevur eitt frávik 3,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru 2.500 t.kr. játtaðar til nýggja autistaheimið í Klaksvík, sum ikki varð sett í verk. Harumframt er avlop á játtanini, sum sett var av til serligan tørv og til óvæntað og trupul mál.

### 8.2.4 *Bústovnar o.a. (løgujáttan)* 8.21.6.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5,5 mió.kr. Minninýtslan er 1,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at tá fyrireikandi arbeiðið var komið nakað áleiðis, stungu prinsippiellir spurningar seg upp um eitt nú tal á búfólkum og um fíggjarkarmar. Tað tók drúgva tíð at fáa hesi viðurskifti upp á pláss, og tí eydnaðist ikki at nýta meira enn ein part av játtanini.

### 8.2.5 *Eldrarøkt (rakstrarjáttan)* 8.21.6.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 272,4 mió.kr. Minninýtslan er 7 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-lóg apríl 2006 | Játtan | Rokn-skapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|---|---|
| 20. Røktarheim | 154.689 | 442 | 155.131 | 150.564 | *-4.567* |
| 23. Eldrarøkt í Sandoynni | 11.474 | 44 | 11.518 | 11.100 | *-418* |
| 25. Heimarøktin | 104.151 | 392 | 104.543 | 102.654 | *-1.889* |
| 27. Økisterapi | 1.225 | 5 | 1.230 | 1.067 | *-163* |
| **Tilsamans** | **271.539** | **883** | **272.422** | **265.385** | ***-7.037*** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 271,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 883 t.kr. í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar 2006.

Minninýtslan stavar m.a. frá undirkontu 20. "Røktarheim", sum hevur eitt frávik 4,6 mió.kr. og undirkontu 25. "Heimarøktin", sum hevur eitt frávik 1,9 mió.kr.

Undirkonta 20. Røktarheim

Sambært landsstýrismanninum lat Røktarheimið á Mørkini ikki upp til tíðina.

Undirkonta 23. Eldrarøktin í Sandoynni

Landsstýrismaðurin vísir á, at av tí at arbeiðsorka vantaði, hevði Eldrarøktin í Sandoynni eina minninýtslu í 2006. Sambært landsstýrismanninum er trupulleikin loystur í  2007.

Undirkonta 25. Heimarøktin

Sambært landsstýrismanninum er trupult hjá skipanini at fáa starvsfólk, og tí er torført at geva fleiri tímar og harvið betra um tænastuna til brúkaran.

Heimarøktin fekk álagt at stovna eitt tilboð til ein tungan. Tað tók longri tíð enn væntað, og játtanin, sum varð sett av til endamálið, varð tí ikki brúkt.

Heimarøktin ætlaði at nýta 550 t.kr. til at automatisera sambandið millum visitatiónsskipanina og Almannastovuna viðvíkjandi egingjaldspartinum. Tað eydnaðist ikki at gera hetta arbeiði í 2006, og tí varð peningurin ikki brúktur.

### *8.2.6 Eldrasambýli (løgujáttan)* 8.21.6.16.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 11,9 mió.kr. Minninýtslan er 6,3 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2006 vóru upprunaliga játtaðar 15 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin lækkað 3,1 mió.kr. vísandi til, at *"Almanna- og Heilsumálaráðið metir, at 3,1 mió. kr. ikki verða nýttar av hesi játtan í ár. Metingin er grundað á, at tær verkætlanir, sum tilsagnir vórðu givnar til í mai 2006, framvegis ikki hava havt við sær útreiðslur fyri landskassan í hesum fíggjarárinum."*

Sambært landsstýrismanninum drógu fleiri av verkætlanunum út, sum tilsøgn í mai 2006 varð givin til.

### *8.2.7 Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan)* 8.21.9.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 188 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2006. Í 2005 varð heldur eingin peningur nýttur.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 umrøddu vit hesa høvuðskontu:

*"Landsgrannskoðanin undrast á, at neyðugt er við einari høvuðskontu til endamálið, og spurdur, veit landsstýrismaðurin ikki, hví henda játtan er á einari sjálvstøðugari høvuðskontu, men hann heldur ikki, at henda játtan hevur nakað við raksturin av Almanna- og Heilsumálaráðnum at gera.*

*Landsstýrismaðurin hevur ongar ætlanir um at gera nakrar broytingar, so leingi talan er um ein part av sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.*

*Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur, at* "sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri sáttmálasettar pedagogar skal miðast ímóti, at Almannastovan árliga sendir pedagogar til framhaldsútbúgving við fullari løn."

*Sambært § 20, stk. 2, í sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya* "verður miðað ímóti, at **Almannastovan** sendir 5 pedagogar árliga til víðari útbúgving á DLH ella á líknandi útbúgvingarskeið við fullari løn frá **Almannastovuni**, uttan aðrar treytir ella eyka útreiðslur fyri pedagogin."

*Sambært § 1 í sáttmálanum fevnir sáttmálin um pedagogar, ið starvast:*

1. *á teimum stovnum, sum eru riknir sambært løgtingslóg nr. 67 um dagstovnar og dagrøkt,*
2. *sum dagrøktarleiðarar,*
3. *á sjálvsognarstovnunum Frítíðarheiminum, Dáanum og Barnaheiminum, á Næmingaheimunum á Sernámsdeplinum, á samdøgursstovnum fyri børn og ung, og fyri verkstaðarassistentar og vikarar á serforsorgarstovnum landsins,*
4. *sum stuðulspedagogar, leiðarar, varaleiðarar og millumleiðarar á stuðulsstovnum og stuðulsskipanum,*
5. *sum pedagogar á Landssjúkrahúsinum,*
6. *á Sernámsdeplinum,*
7. *sum pedagogiskir ráðgevar í barnaforsorgarmálum.*

*Orðingin í § 20, stk. 2, í sáttmálanum leggur upp til, at henda útreiðsla er ein útreiðsla hjá Almannastovuni. Almannastovan hevur tó einki við størstapartin av umrøddu pedagogum at gera, og Almanna- og Heilsumálaráðið umsitur játtanina.*

> *Landsgrannskoðanin vil eisini vísa á, at sambært landsroknskapinum er so at siga einki brúkt av hesari játtan síðani 2001, og vit mæla til, at henda høvuðskonta verður endurskoðað, saman við Fíggjarmálaráðnum.”*

Sambært landsstýrismanninum er í 2007 játtað útbúgving til ein persón, so játtanin verður nýtt í 2007 og væntandi eisini í 2008. Játtanin í 2007 er tí hækkað. Hildið verður, at Almanna- og Heilsumálaráðið kann ikki gera nakað við málið, so leingi sum sáttmálin er óbroyttur.

Landsgrannskoðanin skal enn eina ferð vísa á, at sambært nevnda sáttamála er tað Almannastovan, ið skal rinda lønina til pedagogar undir útbúgving, hóast Almannastovan ikki longur hevur nakað við størstapartin av pedagogunum at gera. Landsgrannskoðanin heldur tað tykist burturvið at halda fram við hesari høvuðskontu, sum Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ræðisrættin á.

# 9 HEILSUMÁL

## 9.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Apoteksverkið (landsfyritøka) | -526 | -348 | 178 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 304.113 | 313.887 | 9.774 |
| Søla av íbúðabygningum (løgujáttan) | -30.000 | - | 30.000 |
| Medicoteknisk tól (løgujáttan) | 13.100 | 13.380 | 280 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 50.588 | 51.660 | 1.072 |
| Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 39.238 | 39.959 | 721 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 102.121 | 103.682 | 1.561 |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 4.710 | 4.913 | 203 |

### *9.1.1 Apoteksverkið (landsfyritøka)* 8.20.2.08.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 150,7 mió.kr. og ein útreiðslujáttan 150,2 mió.kr. Meirnýtslan er 178 t.kr. netto.

Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 162,8 mió.kr. og útreiðslurnar 162,5 mió.kr.

t.kr.

| Apoteksverkið 8.20.2.08. | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -150.732 | -162.818 | *-12.086* |
| Útreiðslur | 150.206 | 162.470 | *12.264* |
| **Tilsamans** | **-526** | **-348** | ***178*** |

Sambært landsstýrismanninum er talan um vanligt frávik av óvissu.

### *9.1.2 Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)* 8.20.3.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 304,1 mió.kr. Meirnýtslan er 9,7 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 301,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 1.344 t.kr.:

- 350 t.kr. til at seta ein reinførissjúkrarøktarfrøðing,
- 994 t.kr. til lønarafturbering í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar í 2006.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 1.300 t.kr. til at gjalda út uppsparda yvirtíð.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina vísti Fíggjarnevndin á, *"at avspáking eigur at vera ein partur av lønarkarminum. Eisini skal nevndin vísa á viðmerkingarnar frá roknskapar-grannskoðanini, har tað í fleiri ár hevur verið gjørt vart við teir nógvu uppspardu tímarnar á Landssjúkrahúsinum. Landsstýrismaðurin eigur at fáa ruddað upp í hesum."*

Sambært landsstýrismanninum varð yvirtíð, sum yvirlæknar áttu á, goldin niður við 1,3 mió.kr. áðrenn ársskiftið. Landssjúkrahúsið hevur síðani arbeitt við at fáa læknarnar inn í vaktarskipanina, soleiðis at yvirtíð verður goldin út regluliga, saldan av útistandandi yvirtíð ikki veksur, og at økið verður betur skipað.

<u>Frágreiðing um meirnýtsluna 9,7 mió.kr.</u>

Um meirnýtsluna vísti landsstýrismaðurin til frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum har m.a. verður sagt:

*Útreiðslurnar til sjúkraviðgerð og røkt, íroknað heilivág, eru hækkaðar nógv meira enn væntað var, tá fíggjarætlanin fyri 2006 varð løgd, og hevur hetta tí givið eina stóra meirnýtslu í mun til játtanina fyri 2006. Bert hesi bæði økini standa fyri útvið 3/4 av meirnýtsluni fyri 2006.*

*Tað er serliga stórur vøkstur í heilivágsútreiðslunum til krabbameinsviðgerðir, nýrasjúkur, giktasjúkur og multiple sclerosa. Seinastu fáu árini er biologiski heilivágurin komin alt meira fram. Talan er um sera kostnaðarmiklan heilivág, men sum eisini virkar munandi betur, enn tann gamli heilivágurin. Samfelagsligi vinningurin av, at hesir sjúklingar í mongum førum verða førir fyri at liva eitt meira virkið lív, er væl størri, enn kostnaðurin av viðgerðini. Lívsgóðskan hjá hesum sjúklingum kann ikki samanberast við støðuna frammanundan.*

*Øktu útreiðslurnar innan vørur til sjúkraviðgerð og røkt koma serstakliga av nýggjum operatiónum innan laparscopi (t.e. kikaraviðgerð). Her er talan um dagføring av "gomlum" viðgerðarhættum, sum bæði er meira effektiv og minni tyngjandi fyri sjúklingin.*

*Eisini er talan um dagføring av eygna-viðgerð, har sjúklingurin fær eina væl skjótari viðgerð, enn fyrr, men har kostnaðurin fyri tilfarið til viðgerðina er hægri, enn til gomlu viðgerðina.*

*Meirkostnaðurin til heilivág og vørur til viðgerð og røkt er 6.900 t.kr.*

*Innan rannsóknarstovukanningar hevur verið stórur vøkstur í virkseminum. Tær ambulantu kanningarnar, sum fyri ein stóran part verða bílagdar av kommunulæknum og øllum serlæknaøkjum á sjúkrahúsunum, eru vaksnar nógv í tali. Tað eru bæði fleiri sjúklingar og talið av kanningum fyri hvønn sjúkling, sum vaksa. Meirkostnaðurin er 961 t.kr.*

*Landssjúkrahúsið hevði eina avtalu við Ríkissjúkrahúsið, har teir gjørdu allar patalogiskar kanningar fyri Landssjúkrahúsið. Landssjúkrahúsið setti ein polskan patolog í starv í 2006 og skuldi hesin, sum tíðin leið, fáa flest allar patalogiskar kanningar gjørdar á Landssjúkrahúsinum. Hetta hevur tó drigið út, og Landssjúkrahúsið hevur tí fyri 2006 havt størri útreiðslur til Ríkissjúkrahúsið, enn roknað varð við frammanundan. Millum annað hevur Landssjúkrahúsið havt ein konsulent við regluligum millumbili at gera kikaraskurðviðgerðir (laparscopi). Meirkostnaðurin er 968 t.kr.*

*Landssjúkrahúsið hevði nakrar óvæntaðar útreiðslur til medicoteknisk tól. Hetta til deils tí, at eitt tól mátti óvæntað útskiftast og til deils, at tólini generelt eru nakað dýrari at viðlíkahalda. Medicotekniska tólakontan hevur seinastu árini mest sum øll verið nýtt til digitalisering av røntgen, og hevur hetta gjørt, at tørvur er á heldur meira viðlíkahaldi, nú tað í hesum tíðarskeiðinum við digital røntgen hevur verið minni til aðrar íløgur til medicoteknisk tól. Meirkostnaðurin er 300 t.kr.*

*Landssjúkrahúsið hevur nógv rusk, sum er vandamikið, og sum skal burturbeinast á rættan hátt. Meirkostnaðurin er 200 t.kr.*

*Meirnýtsla hjá hoyriklinikkini var 170 t.kr. vegna periodiseringar.*

### ***9.1.3 Søla av íbúðabygningum (løgujáttan)*** 8.20.3.05.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 30 mió.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri íbúðabygningarnar á Landssjúkrahúsinum, sum á fíggjarlógini 2005, og aftur í 2006, var mettur til 30 mió.kr. Á fíggjarlógini 2007 er søluprísurin mettur til 35 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum, í juni 2007, verður framvegis arbeitt við at selja bygningarnar, sum væntandi verða klárir at seta til sølu alment fyrst í oktober í 2007.

Ongin dagførd virðismeting

Í apríl 2007 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvør hevur mett um søluprísin, og hvørjar fyritreytir metingin byggir á.

Í juni 2007 greiddi landsstýrismaurin frá, at metingin byggir á eitt upprit frá einum arkitektavirki frá 2002 um ”Bygningsmeting av íbúðarbygningunum á Landssjúkrahúsinum”. Av uppritinum framgongur, at neyðugar umvælingar av bygningunum, ið ætlanin er at selja, verða mettar til um 48 mió. kr., og mett søluvirði, sum teir standa í dag (2002), um 48 mió.kr. Á fíggjarlógini 2005 og 2006 var søluprísurin mettur til 30 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er støðan á bústaðarmarknaðin í Føroyum hesi seinastu árini broytt soleiðis, at upphæddin kundi hækkað frá 30 mió. kr. til 35 mió. kr. Landsstýrismaðurin vísir á, at tað eru vegleiðandi prísir, tí av góðum grundum vita vit ikki, hvør endaligi søluprísurin verður.

Í juli 2007 mælti Landsgrannskoðanin til at gera eina dagførda virðismeting av bygningunum.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin enn eina ferð víst til uppritið frá 2002. Ongar umvælingar eru gjørdar, síðani uppritið varð gjørt. Sambært landsstýrismanninum er tí ivasamt, hvussu nógv ein fær burturúr at gera eina virðismeting afturat.

Landsgrannskoðanini heldur tað vera skilagott at gera eina dagførda virðismeting eftir viðurkendum meginreglum. Ein virðismeting ger seljaran føran fyri at meta um, hvørt tilboðini frá keyparum eru nøktandi, og virðismetingin kann vera ein stuðul í seinni samráðingum við keyparar.

Víkja tilboðini nógv frá virðismetingini, kann spurningur verða settur við, um sølan er nóg væl marknaðarførd, ella um nóg nógv kapping er um søluna. Tað er eisini góður siður, at seljari setir sær ein minstaprís.

Viðhvørt kann seljari seta uppá, at t.d. ein bygningur er trupul at virðismeta, tí hann er so serstakur, einki er at bera saman við o.s.fr., men havast skal í huga, at keypararnir hava ikki fleiri og betri upplýsingar, enn seljarin hevur. Hevur seljari ikki megnað at útvega eina virðismeting, kann tað vera tekin um, at hann ætlar at selja fyri ein ónøktandi prís, og at hann ikki vil ábyrgjast fyri tað; men sjálvandi má eitt mark vera fyri, hvussu kostnaðarmiklar tílíkar virðismetingarnar eru.

Grundgeving fyri sølu

Í juli 2007 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar grundgevingar eru fyri at selja bygningarnar.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at íløgutørvurin til umvælingar av íbúðabygningunum er stórur. Tað er eisini galdandi fyri restina av bygningunum hjá Landssjúkrahúsinum, hóast stórar ábøtur er framdar tey seinni árini. Við at selja íbúðablokkarnar sleppur Landssjúkrahúsið av við leiguvirksemið, ið ikki verður hildið at vera natúrligur partur av virkseminum hjá sjúkrahúsinum, umframt at betri møguleikar eru fyri, at neyðugar ábøtur verða gjørdar av bygningunum.

Vantandi viðlíkahald

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at sjálvt í teimum ringastu kreppuárunum í nítiárunum varð tað hildið at verða alneyðugt, hóast trongar fíggjarligar umstøður, at

halda samfelagsins ognir viðlíka. Í hesum sambandi kann vísast til almennu viðmerkingarnar í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1994, har m.a. stendur:

*"Uppskotið til fíggjarløgtingslóg er sett nakað øðrvísi upp enn fyrr. Allar størru viðlíkahaldsútreiðslur eru settar fyri seg, og eru tær tils. 91,5 mió.kr. Landsstýrið heldur tað vera alneyðugt, hóast trongar fíggjarstøður, at halda samfelagsins ognir viðlíka. Játtanir eru settar av til viðlíkahald av vegum, havnum og øðrum, sum Landsverkfrøðingurin umsitur, skúlum, sjúkrahúsum og øðrum almennum bygningum."*

Í fylgiskjølum til uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1994 stendur m.a.:

*"Í samband við viðlíkahald av landsins ognum, liggur ábyrgdin í dag hjá leiðsluni av tí stovninum, sum húsast í bygninginum. Henda mannagongd hevur ført við sær, serstakliga tey seinastu árini, at viðlíkahald av bygningunum er ofta spart burtur, tá stovnurin skal spara í rakstri, við tí úrslitið, at fleiri bygningar eru í ringum standi.*

*Tá ognirnar ikki verða hildnar viðlíka, verða avleiðingarnar eftir stuttari tíð, at bygningarnir verða niðurslitnir, og tá krevjast stórar íløgur, um bygningarnir skulu gerast nýtiligir aftur."*

Nevnt kann verða, at á landsstýrisfundi 11. september 2000 luttóku bygginevndarformaðurin og tekniski ráðgevin hjá bygginevndini fyri útbyggingini á Landssjúkrahúsinum. Teir vórðu bidnir um at grundgeva fyri metta íløgutørvinum á Landssjúkrahúsinum. Teir vístu m.a. á, at tá tað nú var skjalfest, at Landssjúkrahúsið hevði so átrokandi ábøtur fyri neyðini, kundi ikki verða sæð burtur frá vandanum fyri, at tað kunnu koma bráðfeingis støður, ið kunnu føra til rakstrarsteðg. Sambært fundarfrásøgnini frá formanninum í bygginevndini svaraði løgmaður, at í slíkum førum kundi neyðug játtan verða fingin til vega við eykafíggjarlóg og fíggjarnevndarskjali. Hesum sjónarmiði søgdu hinir landsstýrismenninir seg vera samdar í.

Sambært fundarfrágreiðingini vil tað so sjálvandi føra við sær, at ábøturnar, ið fara at verða gjørdar á Landssjúkrahúsinum komandi árini, ikki fara at verða gjørdar eftir nakrari fastari ætlan, men heldur verða gjørdar so hvørt, sum trupulleikarnir stinga seg upp. Tað vil siga, at eingin planløgd renovering fer í gongd á Landssjúkrahúsinum enn.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina og á annan hátt er Løgtingið seinastu mongu árini kunnað um, at skiftandi samgongur hava raðfest nýbygging/útbygging av sjúkrahúsverkinum framum grundleggjandi viðlíkahald.

Í almennu viðmerkingunum í uppskotinum til løgtingslóg um at høvuðsumvæla og nútíðargera Landssjúkrahúsið, sum landsstýrismaðurin legði fram 3. mars 2006, stendur m.a.:

*"Í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2004 fór nærum øll orkan til nýggja bygningin, sum hevði við sær, at rúmd var ikki fyri grundleggjandi høvuðsumvæling og nútíðargerð av gomlu bygningunum. Eftir stendur, at framhaldandi høvuðsumvæling av gomlu bygningunum er meira átrokandi enn nakrantíð.*

*Íløguætlanin umfatar samlaðu útinningina av endurskoðaðu byggiætlanini hjá Landssjúkrahúsinum í tíðarskeiðinum frá 2006 til 2015.*

*Høvuðsumvæling av íbúðabygningunum er ikki tikin við í ætlanina. Arbeitt verður við at selja nakrar av bygningunum."*

Eftir er bert at staðfesta, at einki skipað viðlíkahald hevur verið av íbúðabygningunum, hóast góðar tíðir í Føroyum. Sum nevnt frammanfyri, helt Landsstýrið í teimum ringastu kreppuárunum tað vera neyðugt og skilagott at halda bygningar viðlíka, so teir ikki vórðu niðurslititnir, tí tað krevjast stórar íløgur, um bygningarnir skulu gerast nýtiligir aftur.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað, í sambandi við eina virðismeting av bygningunum, eisini kundi verið áhugavert at mett um, hvat vantandi viðlíkahald hevur kostað.

### *9.1.4 Medicoteknisk tól (løgujáttan)* 8.20.3.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 13,1 mió.kr. Meirnýtslan er 280 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 10 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 3,1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu umbyggingar- og etableringsútreiðslur, í sambandi við uppsetan av nýggjum tólum, hægri enn mett varð.

### *9.1.5 Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)* 8.20.3.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 50,6 mió.kr. Meirnýtslan er 1.072 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 49,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 220 t.kr. til lønarafturbering í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar í 2006.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 750 t.kr. til at skifta út telefonvekslaran.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna í høvuðsheitum høgir oljuprísir, príshækkingar generelt og nýggjur kostnaðarmikil heilivágur. Somuleiðis gjørdust tvær umbyggingarverkætlanir nakað dýrari enn ætlað.

### *9.1.6 Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)* 8.20.3.15.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 39,2 mió.kr. Meirnýtslan er 721 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 38,3 mió.kr. Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin hækkað 172 t.kr. til lønarafturbering í sambandi við lønarhækking fyri teir síðstu tríggjar mánaðirnar í 2006.

Á eykajáttanarlógini september 2006 varð játtanin hækkað 750 t.kr. til at skifta út telefonvekslaran.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna øktar lønarútreiðslur og langar sjúkrameldingar hjá starvsfólkum. Harumframt hækkaðu útreiðslurnar til heilivág og nýtsluvørur.

### *9.1.7 Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan)* 8.20.3.20.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 102,1 mió.kr. Meirnýtslan er 1.561 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 75.200 | 74.610 | *-590* |
| 22. Flutningur og uppihald | 15.300 | 17.471 | *2.171* |
| 23. Sjúklingahotellið Tórshavn | 11.621 | 11.601 | *-20* |
| **Tilsamans** | **102.121** | **103.682** | ***1.561*** |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 umrøddu vit á s. 72 – 75 játtanina til Serviðgerð uttanlands. Niðanfyri hava vit endurgivið 3 brot úr frágreiðingini:

Konsulentútreiðslur

*”Sambært landsroknskapinum 2005 eru av hesari høvuðskontu nýttar 497 t.kr. til konsulentútreiðslur.*

*Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 greiddi Landsgrannskoðanin frá, at eftir okkara tykki er talan um útreiðslur, ið áttu at verið goldnar av sjúkrahúsunum.*

*Í álitinum um uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2006 vísti meirilutin í Fíggjarnevndini á, at Landsgrannskoðanin hevði víst á fleiri ógreið viðurskifti. Fíggjarnevndin helt, “at landsstýrismaðurin eigur at bera so í bandi, at størri gjøgnumskygni fæst á hesi kontu”.*

*Landsgrannskoðanin hevur í juli 2006 mælt landsstýrismanninum frá at bóka konsulentútreiðslur o.t. á hesa kontu í framtíðini.*

*Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað er Almanna- og Heilsumálaráðið, ið hevur skrivað undir tær 3 avtalurnar við útlendskar konsulentar. Konsulentavtalurnar eru galdandi fyri øll sjúkrahúsini, og endamálið er at tryggja føroyska heilsuverkinum sum heild eina ráðgeving, ið gevur eitt hægri fakligt støði á viðkomandi øki. Talan er um tíðaravmarkaðar konsulentavtalur, ið fevna um øki, har møguliga ein partur av sjúklingunum annars vildi verið sendur uttanlands. Tí verður hildið rættast at bóka útreiðslurnar á kontuna “Serviðgerð uttanlands”.*

*Landsgrannskoðanin vil vísa á, at tvær av avtalunum eru millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Ríkissjúkrahúsið.*

*Onnur avtalan fevnir um onkologiska/-hematologiska konsulenthjálp:*

*“Med henblik på forbedring af den cancerbehandling, der i dag varetages på Færøerne, og om muligt at begrænse antallet af kontrolbesøg på Rigshospitalet.”*

*Hin avtalan fevnir um nefrologiska konsulenthjálp:*

*“Med henblik på at forbedre den nefrologiske behandling, der idag varetages på Færøerne, og om muligt at begrænse antallet af kontrolbesøg på Rigshospitalet”.*

*Báðar avtalurnar fevna um 4 árligar vitjanir av serlæknum o.ø “på sygehuset i Tórshavn”. Avtalurnar kosta ávikavist 160 t.kr. og 130 t.kr. (2002-prísir) um árið.*

*Triðja avtalan, landsstýrismaðurin sipar til, hevur Almanna- og Heilsumálaráðið gjørt við Bispebjerg Hospital um “Børne- og Ungdomspsykiatrisk konsulentfunktion”. Endamálið er “at yde børne- og ungdomspsykiatrisk konsulentbistand ved speciallæge over for ikke-retarderede børn og unge (0-18 år)”. Avtalan fevnir um 2 árligar konsulentvitjanir á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, sum hvør varir í 1 viku. Avtalan kostar 141 t.kr. (2005-prísir) um árið.*

*Í øllum 3 avtalunum er ásett, at sjúkrahúsverkið eisini rindar fyri gisting, ferðaútreiðslur, tíma- og dagpengar o.a. í sambandi við vitjanirnar.”*

Tilsamans eru brúktar umleið 757 t.kr. í konsulentútreiðslum í 2006.

Aðrar serviðgerðir “innanlands”

*”Sambært landsroknskapinum 2005 eru av hesari høvuðskontu nýttar 528 t.kr. til skurðviðgerðir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og 460 t.kr. til skurðviðgerðir á Landssjúkrahúsinum.*

*Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 “um frávík millum játtan og nýtslu o.a.” vístu vit á, at játtanin til “Serviðgerð uttanlands” í 2004 eisini var nýtt til at gjalda útlendskum serlæknum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi løn og ferðaútreiðslur í sambandi við skurðviðgerðir av sjúklingum, sum annars høvdu verið sendir til Danmarkar.*

*Landsgrannskoðanin helt tá, at tað kundi tykjast fløkjasligt, at ein játtan, markað til serviðgerð uttanlands, eisini varð nýtt til serviðgerð innanlands.*

*Í álitinum um uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2006 vísti meirilutin í Fíggjarnevndini á, at Landsgrannskoðanin hevði víst á fleiri ógreið viðurskifti. Fíggjarnevndin helt, “at landsstýrismaðurin eigur at bera so í bandi, at størri gjøgnumskygni fæst á hesari kontu”.*

*Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin gjørt vart við, at í viðmerkingunum til fíggjarlógina er tilskilað, at tænastur kunnu verða keyptar frá útlandinum til serligar viðgerðir, soleiðis at sjúklingar kunnu verða viðgjørdir í Føroyum, í staðin fyri at verða sendir uttanlands, um tað hevur við sær sparingar í sjúkrahúsverkinum. Í tráð við hesa áseting heldur landsstýrismaðurin tað vera í lagi, at hesar útreiðslur verða bókaðar á kontuna "Serviðgerð uttanlands", har sum peningurin verður játtaður."*

Samlað eru 1.071 t.kr. í 2006 brúktar til serviðgerðir á føroysku sjúkrahúsunum, av hesum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 750 t.kr. og á Landssjúkrahúsinum umleið 321 t.kr. Suðuroyar Sjúkrahús hevur einki brúkt til serviðgerðir í 2006.

Viðmerkingar til "konsulentútreiðslur" og "aðrar serviðgerðir innanlands"

*"Landsgrannskoðanin skal viðmerkja, at vit ikki hava sett spurnartekn við, um tað játtanarliga "er í lagi" at bóka hesar útreiðslur, sum gjørt verður. Landsgrannskoðanin hevur roynt at ávara ímóti, at høvuðskontan "Serviðgerð uttanlands" kann enda sum ein fløkja ímillum serviðgerðir uttanlands og serviðgerðir, ið eru framdar innanlands, fyri at minka um útreiðslurnar til serviðgerðir, ið annars vildu verið framdar uttanlands. Ein orsøk til, at játtanin kann enda sum ein fløkja, er, at til ber at føra fram, at ein stórur partur av øllum serviðgerðum, sum fara fram á sjúkrahúsunum í Føroyum, annars vildu verið framdar uttanlands.*

*Landsgrannskoðanin vil mæla til, at játtanin á hesari høvuðskontu verður endurskoðað, saman við Fíggjarmálaráðnum."*

Í juni 2007 boðaði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum frá, at ætlanin er, at málið verður tikið upp undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum 2008.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at málið hevur verið umrøtt á fundi í juli 2007 við Almanna- og Heilsumálaráðið. Ein fyribilsloysn at tryggja gjøgnumskygni er, at undirkonta verður stovnað til serviðgerðirnar, framdar innanlands av vitjandi útlendskum serlæknum. Treytin skal eisini vera, at um summar viðgerðir gerast javnt varandi tilboð, skulu tær flytast til vanliga raksturin hjá sjúkrahúsunum. Fíggjarmálaráðið fer ætlandi at taka hetta mál upp aftur við Almanna- og Heilsumálaráðið í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2008.

Landsgrannskoðanin vil vísa á, at í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er einki broytt.

Aðrar útreiðslur

Í frágreiðingum okkara í oktober 2005 og oktober 2006 vístu vit á, at játtanin til "Serviðgerð uttanlands" hevði verið nýtt til at gjalda:

1. lønar- og ferðaútreiðslur til ein fulltrúa, sum skal samskipa virksemið millum visiterandi yvirlæknarnar og landsstýrismannin og kanna viðurskiftini millum sjúkrahúsini í Føroyum og í Danmark og Sjúklingahotellið Tórshavn,
2. grannskoðanarútreiðslur,
3. heilivág m.a. til dialysu til sjúklingar heima.

Ad 1. Lønar og ferðaútreiðslur

Sambært Búskaparskipan Landsins eru á høvuðskontu 8.20.3.20. "Serviðgerð uttanlands" í 2006 bókaðar kr. 15.367 til ferðing og flutning uttanlands hjá læknastjóranum á Landssjúkrahúsinum.

Sambært landsstýrismanninum luttók læknastjórin á fundum á Ríkissjúkrahúsinum vegna "Serviðgerð uttanlands", tí eru útreiðslurnar bókaðar á hesa kontu.

Landsgrannskoðanin heldur talan er um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Landssjúkrahúsið.

Ad 2. Grannskoðanarútreiðslur

Sambært Búskaparskipan Landsins eru í 2006 bókaðar 23.200 kr. til grannskoðanarútreiðslur. Eftir okkara tykki er talan um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Almanna- og Heilsumálaráðið. Tílík bókingarmannagongd kann avlaga og grugga roknskapin.

Í áliti sínum til fíggjarlógini 2006 tók Fíggjarnevndin undir við Landsgrannskoðanini og lækkaði játtanina til Serviðgerð uttanlands samvarandi.

Í juni 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið er ikki samt við Landsgrannskoðanini og Fíggjarnevndini. Almanna- og Heilsumálaráðið heldur, at tá ið talan er um rakstrarjáttan, skulu útreiðslur, sum beinleiðis kunna knýtast til raksturin, bókast á viðkomandi kontu. Grannskoðanarútreiðslur vegna "Serviðgerð uttanlands" er ikki starvsfólkakostnaður í Almanna- og Heilsumálaráðnum, men ein útreiðsla, sum beinleiðis er knýtt at kontuni "Serviðgerð uttanlands". Tó fer Almanna- og Heilsumálaráðið frameftir at bóka útreiðslurnar á Almanna- og Heilsumálaráðið sambært vilja Løgtingsins.

Landsstýrismaðurin ger vart við, at Fíggjarnevndin flutti 400 t.kr. frá játtanini til "Serviðgerð uttanlands" til játtanina til Almanna- og Heilsumálaráðið. Undan broytingini, sum Fíggjarnevndin framdi, vóru 500 t.kr. settar av til fulltrúa, og harafturat var sett av til grannskoðanarútreiðslur og ferðaútreiðslur. Sostatt hevur Fíggjarnevndin einans flutt ein part av teirri upphædd, sum Almanna- og Heilsumálaráðið hevði sett av til lønarútreiðslur, ferðaútreiðslur og grannskoðan.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eingin játtan er avsett hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum at grannskoða "Serviðgerð uttanlands". Landsstýrismaðurin heldur tí, at støða má takast til málið, áðrenn broyting verður gjørd í mannagongdini.

Landgrannskoðanin vil í hesum sambandi vísa á, at Almanna- og Heilsumálaráðið í 2007 hevur eina samlaða játtan upp á góðar 23 mió.kr., ið m.a. er ætlað til *"yvirskipaða, fyrisitingarliga og fíggjarliga eftirlitið við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum, og yvirskipaðu ráðleggingina av øllum málsøkjum undir ráðnum."*

Ad 3. Heilivágsútreiðslur

Landsgrannskoðanin heldur, at útreiðslur til heilivág eiga at verða játtaðar av Almannastovuni sambært reglunum í K. nr. 100 frá 20. desember 1999 "um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini og almannapensjónslógini".

Í 2006 eru kr. 562.555 brúktar til at keypa tilfar frá Tjaldurs Apoteki, vætu og medisin til dialysuviðgerð.

Sambært landsstýrismanninum í september 2005 *"er Almanna- og Heilsumálaráðið samt við Landsgrannskoðanini í, at útreiðslurnar til heilivág møguliga áttu at verið goldnar av aðrari játtan enn av játtanini til Serviðgerð uttanlands. Í 2004 hevur verið arbeitt við at fáa greiði á, hvørjar útreiðslur til heilivág, ið verða goldnar av játtanini til Serviðgerð uttanlands. Harumframt vórðu møguleikarnir fyri, at útreiðslurnar skula verða goldnar av játtanini til Almannastovuna, eisini lýstir. Almanna- og Heilsumálaráðið fer í næstum at arbeiða víðari við málinum."*

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki nýtt var í málinum, men ætlanin var at fara at hyggja nærri eftir málinum.

Í juni 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið umhugsar, hvussu málið kann verða loyst – men enn er ikki komið longur við málinum

#### 9.1.8 *Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan)* 8.20.4.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 4,7 mió.kr. Meirnýtslan er 203 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna alneyðug umbygging, sum mátti verða gjørd í 2006.

## 9.2 Minninýtsla

#### 9.2.1 *Heilsuátøk* 8.20.1.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.500 t.kr. Minninýtslan er 1.780 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hava kommunur goldið aftur ikki brúktan útgoldnan stuðul í 2005 og 2006.

#### 9.2.2 *Apoteksverkið (løgujáttan)* 8.20.2.09.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 15 mió.kr. Minninýtslan er 7,8 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var játtanin sambært álitinum frá Fíggjarnevndini treytað av, at ein verklagslóg varð samtykt á Løgtingi. Verklagslógin varð samtykt 21. apríl 2006 og lýst 9. mai 2006, stutt fyri summarfrítíðina, og tí varð alt arbeiðið seinkað. At gera slíkar ætlanir tekur drúgva tíð, og harumframt má serfrøðingahjálp fáast frá útlandinum.

#### 9.2.3 *Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)* 8.20.3.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 33 mió.kr. Minninýtslan er 4,6 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru partar av arbeiðinum seinkaðir, sum ætlanin var at gera við nýggja sterilsentralin og kirurgiska ambulatoriið. Fyrra útbjóðingin av B2/B3 varð avlýst vegna manglandi kapping. Tað seinkaði arbeiðinum fleiri mánaðir, soleiðis at tað ikki bar til at byggja fyri ta upphædd í 2006, sum upprunaliga ætlað.